LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

# Ársfrágreiðingin

2024



LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

*Løgtingsins umboðsmaður*
**Ársfrágreiðingin 2024**
© 2024 Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Prentstovan.fo
Myndir: Fotostudio, Faroephoto

ISBN 978-99918-891-4-6

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 5041 0826

# Innihaldsyvirlit

*1)* Um embætið ........ **8**

*2)* Gongdin í 2024 ........ **11**

*3)* Hagtøl ........ **16**

*4)* Álit ........ **30**

*5)* Frágreiðingar ........ **45**

*6)* Avvístar klagur ........ **59**

*7)* Onnur viðgerð og hjálp til borgarar ........ **65**

*8)* Grein:
Barnaættindasáttmálin og málsupplýsingarskyldan ........ **73**

*9)* Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000
um Løgtingsins umboðsmann ........ **79**

*10)* Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur
og kanningar í 2024, har álit og skriv vórðu
almannakunngjørd ........ **83**



# Til Løgtingið

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2024.

Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2025.

Tórshavn, mai 2025



*Hanna Vang*
*Løgtingsins umboðsmaður*

# 1 Um embætið



*Hanna Vang,*
*løgtingsins umboðsmaður*

Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5 - ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins. Tann 9. oktober 2020 legði løgtingsformaðurin uppskot fyri Løgtingið at velja meg til løgtingsins umboðsmann fyri eitt 5 ára skeið frá 1. januar 2021. Eg tók við embætinum 1. apríl 2021. Umframt meg sjálva er embætið mannað við løgfrøðiligu ráðgevum mínum Gurið Joensen, Heina Petersen, Mary Kirstenardóttir Cazabon, fulltrúa og skrivstovufulltrúa Fríðu S. Berg.

Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum (§ 4, stk. 5).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5). Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1). Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2). Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk.

3). Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4). Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5). Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja øll tey støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10). Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá (§ 12).

Lógin, oyðubløð og vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru at finna á heimasíðu míni.

Adressan er:
**Løgtingsins umboðsmaður**
undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008, FO-110 Tórshavn
teldupostadressa: **lum@lum.fo**
Heimasíða: **www.lum.fo**



# 2 Gongdin í 2024

## Innkomin og avgreidd mál í 2024

Í ársfrágreiðingini eru frásagnir av ymiskum málum, sum umboðsmaðurin hevur viðgjørt í 2024. Álit, skriv og frágreiðingar liggja í síni fullu longd í savninum á heimasíðuni. Í 2024 fekk umboðsmaðurin 115 klagur. Av hesum vórðu 91 endaliga avgreiddar innan 31. desember. Harumframt vórðu avgreiddar 13 klagur frá undanfarnum árum. Talið av klagum var eitt sindur hægri enn árini 2021-2023, men á støði við talið av klagum í 2020, tá nógvar klagur vóru í sambandi við covid-19.

Størsta talið av innkomnum klagum í 2024 var á málsøkinum “Børn og ung”. Býtið av málum millum málsøkir sæst í talvu 2. Eins og undanfarin ár fevnir málsøkið ”Børn og ung“ um øll mál viðvíkjandi børnum, eisini um málið ítøkiliga snúði seg um til dømis ein fyrisitingarligan spurning. Av teimum 104 klagunum, sum vórðu avgreiddar í 2024, endaðu 11 við niðurstøðum í antin áliti ella skrivi. 63 klagur vórðu avgreiddar við aðrari viðgerð enn niðurstøðu frá umboðsmanninum, meðan 30 klagur vórðu avvístar uttan viðgerð. Í 2024 vórðu givnar átalur í 7 málum.

## Mál av egnum ávum

Í ársfrágreiðingini eru eisini frásagnir frá málum, sum umboðsmaðurin tók upp og viðgjørdi av egnum ávum í 2024. Í 2024 tók umboðsmaðurin 6 mál upp av egnum ávum, harav 4 vórðu endaliga avgreidd í 2024. Harumframt endaði umboðsmaðurin 1 mál av egnum ávum, sum var byrjað í 2023. Frágreiðingar frá málunum av egnum ávum eru at finna í einum kapitli fyri seg.

## Eftirlitsvitjanir

**Stovnar, sum veita umlætting til børn, ið ikki eru undir barnavernd**

Við árslok 2023 byrjaði umboðsmaðurin eina røð av vitjanum á stovnum, sum veita umlætting til børn og ung, sum ikki eru undir barnavernd. Byrjað varð við at vitja Dáan í Klaksvík í desember 2023. Hildið var áfram í 2024 við at vitja dag- og umlættingarstovnin Mýrisóljan í Runavík í apríl og dag- og umlættingarstovnin Dreymsóljan í Miðvági í oktober. Eftirlitsvitjanirnar vórðu gjørdar sum liður í virksemi umboðsmansins á barnaøkinum, og fokus við vitjanini var børnini á stovninum og teirra viðurskifti. Samandráttir av hesum frágreiðingum eru at lesa í hesi ársfrágreiðing.

**Røktarheim, sum hava deildir til fólk við demens**

Umboðsmaðurin var í 2024 á eftirlitsvitjanum á tveimum røktarheimum, sum hava deildir til fólk við demens. Vitjað varð á demensdeildini, Handarastovu á Lágargarði í

Tórshavn í mars, og á demensdeildini, Suðurstovu á Eysturoyar ellis- og røktarheimi í juni. Eftirlitsvitjanirnar vórðu rættaðar móti støðuni hjá persónum við týðandi sálarligum virkistarni, demens, sum búgva á stovni, teirra sjálvsavgerðarrætti og inntrivum, sum tey ikki geva ella hava førleikar at geva samtykki til. Samandráttur av hesum frágreiðingum eru at lesa í hesi ársfrágreiðing.

Umboðsmaðurin var harumframt í november á eftirlitsvitjan á Gerðisgarði í Skálavík, sum veitur bútilboð til borgarar við demens. Henda frágreiðing verður tikin við í ársfrágreiðingina fyri 2025.

## Fyrispurningar

Umframt móttiknar klagur fær umboðsmaðurin hvørt ár munnligar og skrivligar fyrispurningar. Í 2024 fekk umboðsmaðurin 86 fyrispurningar, sum snúðu seg um sera ymisk evnir. Felags fyri allar fyrispurningarnir var, at borgararnir sótu við spurningum um sína rættarstøðu, og hvar teir kundu venda sær fyri at finna svar. Spurningar vóru eitt nú um málsviðgerðartíð í málum um fyritíðarpensjón, um kærumøguleika í málum um broyting av byggisamtykt, í setanarmálum, í barnaverndarmálum og um rættindi í sambandi við kloakkviðurskifti.

Umboðsmaðurin vegleiðir borgarar um, hvørt klaga kann sendast til umboðsmannin. Um málini ikki eru endaliga viðgjørd innan fyrisitingina, verður borgarin vístur til at nýta kærumøguleikan. Um tørvur er á løgfrøðiligari ráðgeving verður víst til Rættarhjálp Føroya.

## Grein

Umboðsmaðurin er av Føroya Løgtingi biðin um at hava eitt serligt eftirlit við, at Barnarættindasáttmálin hjá ST verður hildin, og gera Løgtingið og Landsstýrið varug við, um lógir og fyrisitingarligar ásetingar ikki eru sambæriligar við Barnarættindasáttmálan.

Í eina tíð hevur umboðsmaðurin í sambandi við mál á barnaøkinum sett sjóneykuna á upplýsingarskylduna hjá myndugleikum, og hvussu skjalfesting og journalisering fer fram. Umboðsmaðurin hevur eitt nú í onkrum málum sett myndugleikum spurningar, um nær samrøða hevur verið við barnið, hvussu barnsins sjónarmið eru lýst, og biðið um skjalprógv úr málinum viðvíkjandi hesum viðurskiftum.

Í ársfrágreiðingini sæst grein umboðsmansins frá august 2024 um Barnarættindasáttmálan og málsupplýsingarskylduna, sum lýsir, hvørji krøv umboðsmaðurin metir, at Barnarættindasáttmálin setur til málsviðgerðina hjá myndugleikum. Við støði í høvuðsreglunum í Barnarættindasáttmálanum um barnsins besta (grein 3) og barnsins sjónarmið (grein 12) lýsir greinin upplýsingarskylduna, notatskylduna og skylduna at journalisera.

## Luttøka í tiltøkum

Umboðsmaðurin leggur seg eftir at luttaka á fundum við samstarvsfelagar í norðurlendskum og altjóða høpi. Eisini vil umboðsmaðurin fegin vera við til tiltøk, har høvi er at kunna um Barnarættindasáttmálan og kærumøguleikan til umboðsmannin.

**Umboðsmaðurin á altjóða umboðsmannastevnu í Haag**
Í døgunum 14. - 17. mai luttók umboðsmaðurin saman við einum ráðgeva á trettandu altjóða umboðsmansstevnuni í Den Haag í Niðurlondum. Samskipari og vertur fyri stevnuni var umboðsmaðurin í Niðurlondum. The International Ombudsman Institution (IOI) varð sett á stovn í 1978. IOI er ein alheimsfelagsskapur fyri umboðsmenn. Limaskarin telur yvir 200 óheftar umboðsmansstovnar frá fleiri enn 100 londum um allan heim. Orsaka av covid-19 avmarkingum eru tað 8 ár síðani síðsta alheims stevnan varð hildin fysiskt. Írski umboðsmaðurin var vertur fyri eini talgildari stevnu í 2021.

Tað eru eyðsæð stórir munir á, hvørjar avbjóðingar umboðsmenn kring heimin hava at takast við. Hóast hetta, og hóast munir í heimildunum og skipanini av embætunum, so var tað sera kveikjandi og læruríkt at kunna samrøða og luta royndir. Yvirskriftin fyri stevnuna var “Act together for our tomorrow”. Viðgjørd vórðu fleiri evnir, har umboðsmenn kunnu vera við at betra um rættarstøðuna hjá borgarum. Eitt nú var síðsti dagurin settur av til barnarættindi. Í tí sambandi fekk Løgtingsins umboðsmaður høvi at leiða ein fyrilestur um verju av børnum í einum alsamt meira talgildum heimi.

**Norðurlendsku barnaumboðini á fundi í Føroyum**
Í døgunum 26. til 29. mai var umboðsmaðurin vertur fyri árligum fundi millum norðurlendsku barnaumboðini. Á fundinum luttóku barnaumboðini úr Íslandi, Danmark, Noreg, Svøríki, Finnlandi og Álandi.
Kunnað varð um virksemið hjá einstøku stovnunum seinasta árið, eins og møguleiki var at umrøða evnir av felags áhuga. Høvuðsevnið á fundinum hesuferð var tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin hjá børnum, og høvið var at vitja stovnar og fáa innlit í føroysku viðurskiftini.
Harumframt sýndu Svøríki og Noreg síni áhugaverdu talgildu vegleiðingaramboð, hvørs endamál er at hjálpa myndugleikum at lýsa barnsins sjónarmið og at leggja dent á barnsins besta í sambandi við avgerðarvirksemi. Vegleiðingaramboðini eru nýtilig bæði til avgerðir viðvíkjandi einstaklingum og á yvirskipaðum støði.

**Norðurlendskur umboðsmannafundur í Stavanger**
Í døgunum 19. til 21. august var umboðsmaðurin saman við einum ráðgeva til norðurlendskan umboðsmannafund í Stavanger. Hesir fundir verða hildnir annaðhvørt ár og eru sera virðismiklir fyri embætið hjá Løgtingsins umboðsmanni. Felags fyrisitingarligar og løgfrøðiligar avbjóðingar verða umrøddar, eins og høvi er at fáa íblástur frá hvørjum øðrum.

**Norðurlendsk barnaverndarráðstevna**
Í døgunum 2. - 4. september var umboðsmaðurin í Oslo í sambandi við Nordisk Børneværnskongress (NBK), sum er ein felags norðurlendsk ráðstevna, sum barnaverndirnar í Noreg, Danmark, Føroyum, Finlandi, Íslandi og Svøríki skipa fyri.

Umboðsmaðurin varð boðin at luttaka í einum kjaki saman við íslendska barnaumboðnum, Salvør Norðdal, og nývalda norska barnaumboðnum, Mina Gerhardsen. Tosað varð um, hvørjar avbjóðingar umboðini síggja í sínum londum.

Umboðsmaðurin vísti eitt nú á, at Føroyar vegna sína støðd í summum førum kann fáa avbjóðingar við at veita sertilboð og serviðgerð. Við støði í hagtalsfrágreiðingini hjá Barnaverndarstovuni fyri 2023, og málum sum høvdu verið frammi, vísti umboðsmaðurin á, at vit í Føroyum ikki hava møguleika at seta børn í styrktar fosturfamiljur, um umsorganaryvirtikin børn hava varandi sjúku ella bera brek. Eisini varð víst á vantandi familjuviðgerðarstovnin, sum Barnaverndarstovan á triðja árið saknaði at kunna vísa familjum til. Her er vert at geva sær far um, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið í desember kunnaði um, at ein Familjutænasta nú verður skipað í samstarvi við Kommunufelagið.

**Barnarættindadagurin í Norðurlandahúsinum**

Mikudagin 20. november 2024 var altjóða barnarættindadagurin hátíðarhildin við einum næmingaráðstiltaki í Norðurlandahúsinum. Tiltakið varð skipað av Barnaverkætlanini hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum saman við Undirvísingarstýrinum, Námi, Barnabata og Norðurlandahúsinum. Næmingaumboð fyri skúlarnar kring landið vórðu boðin at luttaka. Tiltakið setti sjóneykuna á Barnarættindasáttmálan og legði høvuðsdent á grein 12 í sáttmálanum. Gjøgnum kreativar verkstovur fingu næmingarnir roynt seg í at brúka sína rødd og at koma við sínum sjónarmiðum. Umboðsmaðurin fekk høvi at greiða frá Barnarættindasáttmálanum og týdninginum av, at børnini gera vart við sína meining, bæði sum einstaklingar og sum umboð fyri næmingarnar á sínum skúlum.



# 3 Hagtøl

| | |
|---|---|
| Talva 1–3 | Innkomnar klagur í 2024 |
| Talva 4–7 | Klagur, sum blivu lidnar í 2024 |
| Talva 8 | Mál av egnum ávum |
| Talva 9–13 | Málsviðgerðartíðin av málum, sum blivu liðug í 2024 |
| Mynd 1–6 | Sammetingar við undanfarin ár |

# Innkomnar klagur í 2024 býttar á myndugleikar

Í 2024 komu inn 115 klagur.
Hesar klagur vóru býttar soleiðis millum ymisku myndugleikarnar:

Talva 1

| Myndugleiki | Klagur |
|---|---|
| Almanna- og mentamálaráðið | 3 |
| Almannaverkið | 13 |
| Annað | 1 |
| Barna- og útbúgvingarmálaráðið | 9 |
| Barnaverndartænasta | 7 |
| Blákrossheimið | 1 |
| Búnaðarstovan | 4 |
| Eysturskúlin | 2 |
| Fíggjarmálaráðið | 3 |
| Fiski- og samferðslumálaráðið | 6 |
| Formansskapurin í Løgtinginum | 1 |
| Føroya Kærustovnur | 6 |
| Gjaldstovan | 1 |
| Glasir | 2 |
| Heilbrigdi | 1 |
| Heilsumálaráðið | 3 |
| Heilsutrygd | 3 |
| Kappingareftirlitið | 1 |
| Kommunur | 24 |
| Landsgrannskoðanin | 1 |
| Landsverk | 4 |
| Løgmansskrivstovan | 3 |
| Sernám | 2 |
| SEV | 1 |
| Sjóvinnustýrið | 1 |
| Strandfaraskip Landsins | 3 |
| Taks | 3 |
| Umhvørvismálaráðið | 1 |
| Umhvørvisstovan | 2 |
| Uttanríkis- og vinnumálaráðið | 2 |
| Vanlukkutryggingarráðnum (Arbeiðs- og Brunaeftirlitinum) | 1 |
| **Tilsamans** | **115** |

# Innkomnar klagur í 2024 býttar á málsøki

Talva 2

| Málsøki | Tal av klagum |
|---|---|
| Almanna-, familju og heilsumál | 12 |
| Børn og ung | 21 |
| Flutningur, tele- og dátasamskifti og vegir | 13 |
| Kommunumál | 6 |
| Lendis- og búnaðarmál, matrikul | 14 |
| Skattur og avgjøld v.m. | 7 |
| Starvsfólkamál og arbeiðsmarknaðarmál | 16 |
| Umhvørvis, byggi-/leigumál og friðing | 11 |
| Undirvísing, gransking, kirkja og mentan | 7 |
| Uttanríkis- og verjumál | 0 |
| Vinnulívs- og fiskivinnumál v.m. | 8 |
| Annað | 0 |
| **Tilsamans** | **115** |

# Innkomnar klagur í 2024 býttar á evni

Talva 3

| Evni | Tal |
|---|---:|
| Avgerð | 29 |
| Vantandi avgerð | 8 |
| Atburð | 1 |
| Gegni | 1 |
| Grundgeving | 0 |
| Innlit | 22 |
| Málsviðgerðartíð | 16 |
| Notatskylda og journalisering | 0 |
| Partshoyring | 2 |
| Tagnarskylda og viðgerð av persónsupplýsingum | 0 |
| Útinnandi fyrisiting | 8 |
| Vantandi kunning | 1 |
| Vantandi svar | 11 |
| Vegleiðing | 0 |
| Aðrir málsviðgerðarspurningar | 16 |
| **Tilsamans** | **115** |

## Endaliga avgreiddar klagur í 2024

Av teimum 115 klagunum, sum komu inn í 2024, vóru 91 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2024. Harumframt vóru avgreiddar 13 klagur frá undanfarnum árum. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

Talva 4

| Klagur býttar á myndugleika | | Endaðar við | | |
|---|---|---|---|---|
| **Myndugleiki** | **Klagur** | **Avvístar** | **Onnur viðgerð** | **Viðgjørdar við áliti ella skrivi** |
| Almanna- og mentamálaráðið | 2 | | 2 | |
| Almannaverkið | 14 | 5 | 9 | |
| Annað | 1 | | 1 | |
| Barna- og útbúgvingarmálaráðið | 7 | 1 | 5 | 1 |
| Barnaverndartænastur | 3 | 2 | 1 | |
| Blákrossheimið | 1 | 1 | | |
| Búnaðarstovan | 3 | 1 | 2 | |
| Eysturskúlin | 1 | | 1 | |
| Fíggjarmálaráðið | 3 | 2 | 1 | |
| Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið | 4 | 1 | 1 | 2 |
| Formansskapurin í Løgtinginum | 1 | 1 | | |
| Føroya Kærustovnur | 7 | 4 | 3 | |
| Gjaldstovan | 1 | 1 | | |
| Glasir | 2 | 2 | | |
| Heilbrigdi | 1 | 1 | | |
| Heilsumálaráðið | 3 | | 3 | |
| Heilsutrygd | 4 | | 4 | |
| Kappingareftirlitið | 1 | | 1 | |
| Kommunur | 24 | 4 | 16 | 4 |
| Landsgrannskoðanin | 1 | 1 | | |
| Landsverk | 3 | 1 | 2 | |
| Leigunevndin | 1 | | | 1 |
| Løgmansskrivstovan | 2 | | 1 | 1 |
| Sernám | 1 | | 1 | |
| SEV | 3 | | 3 | |
| Sjóvinnustýrið | 1 | | 1 | |
| Strandfaraskip Landsins | 3 | 2 | 1 | |
| Taks | 2 | | 2 | |
| Umhvørvismálaráðið | 2 | | | 2 |
| Umhvørvisstovan | 1 | | 1 | |
| Uttanríkis- og vinnumálaráðið | 1 | | 1 | |
| **Tilsamans** | **104** | **30** | **63** | **11** |

## Viðgjørdar klagur í 2024 har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar

Í 2024 vóru viðgjørdar 63 klagur, har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar. Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 5

| Onnur viðgerð og hjálp | Klagur |
|---|---:|
| Gongd komin á málið | 9 |
| Umboðsmaðurin metti ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið | 48 |
| Klagari vístur til kærumyndugleika | 1 |
| Málið tikið uppaftur | 1 |
| Annað | 4 |
| **Tilsamans** | **63** |

## Avvístar klagur í 2024

Í 2024 vóru 30 klagur avvístar av ymiskum orsøkum.
Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 6

| Avvísingarorsøk | Klagur |
|---|---:|
| Innkomin ov seint | 5 |
| Kærumyndugleiki ikki troyttur | 16 |
| Uttanfyri heimildarøki | 9 |
| **Tilsamans** | **30** |

## Viðgjørdar klagur í 2024 býttar á málsøki

Tey málini, sum vóru endaliga viðgjørd í 2024, kunnu býtast upp eftir málsøki á hendan hátt:

Talva 7

| Málsøki | Klagur |
|---|---:|
| Almanna-, familju og heilsumál | 13 |
| Børn og ung | 17 |
| Flutningur, tele- og dátasamskifti og vegir | 11 |
| Kommunumál | 4 |
| Lendis- og búnaðarmál, matrikul | 10 |
| Skattur og avgjøld v.m. | 6 |
| Starvsfólkamál og arbeiðsmarknaðarmál | 14 |
| Umhvørvis, byggi-/leigumál og friðing | 18 |
| Undirvísing, gransking, kirkja og mentan | 5 |
| Uttanríkis- og verjumál | 0 |
| Vinnulívs- og fiskivinnumál v.m. | 6 |
| Annað | 0 |
| **Tilsamans** | **104** |

## Mál tikin upp av egnum ávum - eftirlitsvitjanir og kanningar

Av teimum 6 málunum, sum umboðsmaðurin sjálvur tók upp í 2024, vóru 4 endaliga avgreidd innan 31. desember 2024. Harumframt var 1 mál avgreitt frá undanfarnum ári. Frágreiðingarnar kunnu lesast frá síðu 45.

Talva 8

| Avgreiddu málini eru býtt soleiðis millum ymisku myndugleikarnar | | |
|---|---|---|
| **Byrjað** | **Heiti á máli** | **Myndugleiki** |
| 2023 | Eftirlitsvitjanir á stovnum, sum veita umlætting til børn, ið ikki eru undir barnavernd - Dáin | Almannaverkið |
| 2024 | Eftirlitsvitjanir á stovnum, sum veita umlætting til børn, ið ikki eru undir barnavernd - Mýrusóljan | Almannaverkið |
| 2024 | Eftirlitsvitjanir á stovnum, sum veita umlætting til børn, ið ikki eru undir barnavernd - Dreymsóljan | Almannaverkið |
| 2024 | Eftirlitsvitjanir á røktarheimum - Lágargarður | Tórshavnar kommuna |
| 2024 | Eftirlitsvitjanir á røktarheimum - Roðin | Økistænastan Roðin |

## Málsviðgerðartíðin av klagum, sum endaðu við áliti ella skrivi

Miðalviðgerðartíðin av teimum 11 endaligu viðgjørdu klagunum, har álit vóru skrivað, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 9

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | | 28 | dagar |
| Samlað | 4 | mðr. | 24 | dagar |

## Málsviðgerðartíðin av klagum, har umboðsmaðurin hevur veitt aðra viðgerð og hjálp til borgarar.

Miðalviðgerðartíðin av teimum 63 klagunum, har umboðsmaðurin veitti borgarum aðra hjálp og viðgerð, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 10

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | | 10 | dagar |
| Samlað | 1 | mðr. | 14 | dagar |

# Málsviðgerðartíðin av avvístum klagum

Miðalviðgerðartíðin av teimum 30 avvístu klagunum var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 11

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | | 4 | dagar |
| Samlað | 1 | mðr. | 4 | dagar |

# Málsviðgerðartíðin av bæði viðgjørdum og avvístum klagum

Miðalviðgerðartíðin fyri allar klagur, bæði avvístar og endaligar viðgjørdar klagur, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 12

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | | 10 | dagar |
| Samlað | 1 | mðr. | 22 | dagar |

# Málsviðgerðartíðin av málum av egnum ávum:

Miðalviðgerðartíðin av teimum 5 málunum, sum vóru avgreidd í 2024, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 13

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Samlað | 4 | mðr. | 18 | dagar |

# Sammetingar 2021–2024

Mynd 1




## Avvísingarorsøk

Mynd 2



# Innkomnar klagur býttar á málsøki

Mynd 3




# Innkomnar klagur býttar á evni

Mynd 4



## Innkomnar klagur býttar á áðalráðini við undirliggjandi stovnum, kommunur, Føroya Kærustovn og mál um børn og ung

**Tá nýtt landsstýrið verður skipað, hendir at aðalráð skifta heiti og málsøkir, tí ber ikki altíð til at gera samanberingar yvir fleiri tíðarskeið. Í hesum sambandi eru tølini fyri 2022 sett í talvu fyri seg.*

Mynd 5






# Innkomnar klagur 2001 – 2024

Mynd 6




TORSHAVN

# 4 Álit

## Álit og skriv

Umboðsmaðurin viðger klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum. Ein borgari kann t.d. klaga um, at ein umsókn er noktað, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið ella framferðarháttin hjá myndugleikanum.

Um umboðsmaðurin, eftir at hava kannað málið, kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur klagaranum viðhald, kann hann finnast at myndugleikanum. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Umboðsmaðurin kann ikki sjálvur broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í summum førum er umboðsmaðurin samdur við myndugleikanum, men av tí at umboðsmaðurin metir, at evnið hevur almennan áhuga, almannakunnger umboðsmaðurin eitt skriv um niðurstøðu sína.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur avgreitt við einum áliti ella skrivi.

**MÁL NR. 23/11561**

### Klaksvíkar kommuna átalu fyri handfaringina av áheitanum um óljóð

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um handfaringina hjá Klaksvíkar kommunu av áheitanum klagarans um óljóð, ið stavaði frá virkseminum á havnarøkinum í Norðhavnini.

Klaksvíkar kommuna upplýsti, at í sambandi við áheitanir um óljóð setti kommunan seg í flestu førum í samband við fráboðara gjøgnum telefon. Umboðsmaðurin skilti eisini á frágreiðingini, at telefonsamrøðurnar ikki vórðu skrásettar sum telefonnotat.

Umboðsmaðurin fekk ikki mett um, hvørt Klaksvíkar kommuna hevði givið klagaranum eina nóg greiða afturboðan í sambandi við mongu áheitanirnar um óljóð, ið klagarin hevði sent kommununi.

Umboðsmaðurin vísti í hesum høpi á týdningin av, at kommunan hevur eina greiða mannagongd fyri hvør, ið hevur ábyrgdina av at svara einari áheitan, ið verður send kommununi, soleiðis at áheitanir ikki detta niðurímillum.

Í sambandi við støðuna har býráðslimir móttaka áheitanir um óljóð, minti umboðsmaðurin Klaksvíkar kommunu á, at býráðslimir aloftast bæði hava eina støðu sum politikkari og eina støðu sum umsitari/avgerðarmyndugleiki í einari kommunalari nevnd. Sum myndugleiki hava býráðslimirnir tá, eins og starvsfólk hjá kommununi, skyldu at tryggja sær, at skjøl, sum hoyra til eitt fyrisitingarligt mál, verða skrásett og tøk hjá viðkomandi málsviðgera.

Umboðsmaðurin viðgjørdi eisini leiklutin hjá Klaksvíkar kommunu sum eftirlitsmyndugleiki á umhvørvisverndarøkinum.

Undir viðgerðini kom fram, at óljóð frá skipum er fevnt av einari felagskommunalari reglugerð, ið kom í gildi í 2021, men henda reglugerð fevnir ikki um óljóð frá frystibingjum á havnarøkinum.

Umboðsmaðurin spurdi tí Umhvørvismálaráðið, hvør støðan var viðvíkjandi óljóði á havnarøkjum, ið ikki stavaði frá skipum.

Umhvørvismálaráðið greiddi umboðsmanninum m.a. frá, at Umhvørvisstovan í 2011 hevði latið eina vegleiðing gera, ið setti nøkur markvirði fyri óljóð frá virksemi, eitt nú á einum havnarøki, men at ráðið helt tað vera ivasamt, um kommunurnar høvdu neyðugan kunnleika til hesa vegleiðing. Ráðið upplýsti fyri umboðsmanninum, at ráðið fór at heita á Umhvørvisstovuna, um at veita kommununum kunning um vegleiðingina. Umboðsmaðurin tók hettar til eftirtektar.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Klaksvíkar kommunu eina átalu fyri handfaringina av áheitanum klagarans um óljóð. Umboðsmaðurin grundaði hesa fatan á, at Klaksvíkar kommuna ikki hevði skjalprógvað fyri umboðsmanninum, at klagarin hevði fingið greiða afturboðan um, hvat kommunan fór at gera í sambandi við tær ymisku fráboðanirnar og klagurnar, og at handfaringin ikki samsvaraði við góðan fyrisitingarsið ella vegleiðingarskylduna í § 7, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Grundað á frágreiðingina frá Umhvørvismálaráðnum og vegleiðingina frá Umhvørvisstovuni um óljóð, mælti umboðsmaðurin Klaksvíkar kommunu til at gera mannagongdir og reglugerð um óljóð í sambandi við virksemi, har Klaksvíkar kommuna er eftirlitsmyndugleiki.

MÁL NR. 23/16837

# Umhvørvismálaráðið fekk átalu fyri málsviðgerðina í sambandi við góðkenning av broyting av byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu

Klagað var um málsviðgerðina og góðkenningina hjá Umhvørvismálaráðnum, dagfest 10. juli 2023, av broyting av byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu, § 29 D: Havnarøki, stk. 4.

Klagarin helt, at broytingin kundi ikki gerast í galdandi yvirskipaðu góðkendu byggisamtykt, men átti at verið gjørd við nýggjum og greiniligum reglum, eitt nú við nýggjari serstakari byggisamtykt.

Umboðsmaðurin var ikki samdur og helt, at ein kommuna, sambært lóg um býarskipanir og byggisamtyktir, kann gera broytingar í eini byggisamtykt, herundir eisini í tekstinum fyri ávís øki, uttan at gera eina nýggja serstaka byggisamtykt hvørja ferð.

Tvøroyrar kommuna hevði, tann 23. februar 2023, lagt fram eitt uppskot til broyting av byggisamtykt og kunngjørt broytingina eftir reglunum í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir. Eftir at tíðarfreistin var farin, tók býráðið støðu til innkomin mótmæli, eins og tað á býráðsfundi, tann 27. apríl 2023, samtykti, at ein áseting skuldi fáa aðra orðing enn hana, sum hevði verið í almennu kunngerðini. Tann broytta orðingin send Umhvørvismálaráðnum til góðkenningar.

Hetta førdi við sær, at umsóknin til Umhvørvismálaráðið var um góðkenning av nýggjari orðing, sum ikki hevði verið alment kunngjørd eftir reglunum í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

Umhvørvismálaráðið metti, at talan var um eina broyting, sum ikki broytti identitetin í upprunaliga uppskotinum, og hevði tí ikki kravt nýggja hoyring. Umhvørvismálaráðið vísti á, at broytta orðingin ikki gav loyvi til nakað, sum upprunaliga orðingin ikki gav loyvi til.

Umboðsmaðurin var ikki samdur við Umhvørvismálaráðnum í hesi meting. Umboðsmaðurin vísti á, at byggisamtyktir ikki einans snúgva seg um at loyva virksemi, men eisini um at áseta avmarkingar fyri nýtslu av ávísum økjum. Hóast broytta uppskotið í mun til klagaran helst ikki kundi sigast at verða meiri inntrívandi, so innihelt tað avmarkandi ásetingar, sum ikki vóru í fyrra uppskotinum.
Umhvørvismálaráðið átti tí eftir meting umboðsmansins at kravt, at uppskotið varð lagt fram til alment eftirlits av nýggjum og nýggja almenna kunngerð av uppskotinum, áðrenn uppskotið varð lagt fyri býarskipanarnevndina.

Umboðsmaðurin helt tað heldur ikki vera nøktandi, at Umhvørvismálaráðið, í sambandi við kanning sína av formligu viðurskiftunum, at sýna til ikki skrivaði eitt notat um sína meting av formligu viðurskiftunum, áðrenn tað varð sent býarskipanarnevndini til ummælis.

Umboðsmaðurin helt, at Umhvørvismálaráðið ikki átti at góðkent uppskotið til broyting av byggisamtyktini tann 10. juli 2023. Ráðið fekk eina eina átalu fyri málsviðgerðina og mælt var til at endurskoða málið.

*Uppfylging*
*Við skrivi tann 1. mars 2024 boðaði Umhvørvismálaráðið umboðsmanninum frá, at góðkenningin hjá Umhvørvismálaráðnum av broytingum í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu varð lutvíst ógildað. Ráðið hevði sent avgerð um hetta til Tvøroyrar kommunu og samstundis kunna um, at tað stóð upp til Tvøroyrar kommunu at taka møgulig stig til nýtt uppskot til byggisamtykt sambært vanligari mannagongd og ásetingunum í býarskipanarlógini. Tvøroyrar kommuna sendi seinni nýtt uppskot til býarskipanarnevndina.*

**MÁL NR. 23/18827**

## Álit um viðgerðartíð og vantandi svar frá Tórshavnar kommunu viðvíkjandi klagu um garðbygging

Ein borgari klagaði um, at Tórshavnar kommuna ikki svaraði hansara fyrispurningi um garðbygging hjá grannum klagarans.

Borgarin spurdi yvir eitt tíðarskeið á góðar sjey mánaðir Tórshavnar kommunu, um grannar klagarans kundu byggja garðar, ið ikki luku ásetingarnar í skeytinum, har Tórshavnar kommuna við tinglýstari byrðu hevði tryggjað sær átalurætt.

Tórshavnar kommuna vísti á, at klagari ikki hevði fingið svar orsakað av, at málsviðgerin hevði verið sjúkur í longri tíðarskeið.

Umboðsmaðurin helt eftir umstøðunum hetta ikki vera umberandi orsøk fyri, at klagari ikki hevði fingið svar.

Kommunan hevði harumframt at sýna til ikki framt nakra veruliga málsviðgerð av gørðunum í mun til tinglýstu ásetingarnar í skeytinum um, at byggimyndugleikin skal góðkenna garðarnar, og at dentur skal leggjast á, at hegnið gevur eina dámliga rammu og klæðir økinum út frá eini heildarmetan.

Tórshavnar kommuna hevði undir málsviðgerðini hjá umboðsmanninum kunnað klagara

um, at kommunan ikki var sinnað at gera átalurætt sín galdandi vísandi til, at granni mótvegis granna hevði átalurætt.

Umboðsmaðurin helt tað ikki vera nøktandi og ei heldur í samsvar við góðan fyrisitingarsið, at kommunan sá burtur frá tinglýstu ásetingunum um bygging av gørðum, samstundis sum tinglýsta byrðan stóð við.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu eina átalu fyri ikki at hava handfarið málið á nøktandi hátt og mælti kommununi til at endurskoða málið og fyrihalda seg til tinglýstu ásetingarnar í byrðuni.

Umboðsmaðurin minti eisini Tórshavnar kommunu á at svara borgarum innan rímiliga tíð og  mælti kommununi til at skipa mannagongdir fyri, hvussu borgarar, sum umvegis teldupost venda sær til burturstødd starvsfólk, fáa svar.

*Uppfylging*
*Tórshavnar kommuna kunnaði eftir álitið um, at málið varð tikið uppaftur. Undir uppafturtøkuni valdi kommunan eftir eina meting at góðkenna garðarnir, sum klagað var um. Umboðsmaðurin metti seg ikki hava grundarlag at finnast at hesum ella krevja, at kommunan nýtti sín átalurætt, við tað at kommunan segði seg hava gjørt eina ítøkiliga meting av umstøðunum.*

**MÁL NR. 23/19764**

## Leigunevndin skal skipa sína viðgerð av kærumálum soleiðis, at tey kunnu avgreiðast skjótast gjørligt

Ein borgari klagaði um langa avgreiðslutíð hjá Leigunevndini av kærumáli hansara um uppsøgn úr einum bústaðarleigumáli. Málsviðgerðartíðin var 8 mánaðir.

Setiumboðsmaðurin visti á, at sambært § 28 í leigulógini hevur Leigunevndin skyldu til skjótast gjørligt at taka avgerð í kærumálum. Hvat “ skjótast gjørligt” merkir velst um upplýsingarnar í málinum, og hvussu torgreitt málið er. Tað bar tí ikki generelt at siga, um 8 mánaðir var ov long viðgerðartíð í einum kærumáli, men má hetta metast út frá umstøðunum í einstaka málinum.

Í sambandi við gjøgnumgongd av málinum hevði setiumboðsmaðurin heft seg við, at ongin svarfreist var ásett í skrivunum frá Leigunevndini um partshoyring og innheintan av upplýsingum. Setiumboðsmaðurin vísti á, at freistir fyri at svara ella at lata upplýsingar kunnu skunda undir viðgerðina og virka fyri, at eitt kærumál verður framt skjótast gjørligt, og at tað tí er góð fyrisiting at nýta freistir til at fremja eina skjóta málsviðgerð.

Við atliti at kravinum í § 28, stk. 1 um skjóta avgerð helt setiumboðsmaðurin, at væntandi

áseting av freistum var ein mangul í málsviðgerðini í hesum máli og orsøk til, at avgerðin ikki varð tikin skjótast gjørligt.

Setiumboðsmaðurin gav Leigunevndini eina átalu fyri ikki at hava avgreitt kærumálið skjótast gjørligt samsvarandi § 28, stk. 1 í leigulógini.

Eisini mælti setiumboðsmaðurin Leigunevndini til at antin at gera mannagongdir fyri málsviðgerðina av kærumálum m.a. við atliti at kravinum í § 28, stk. 1 um skjóta avgerð ella at heita á Umhvørvismálaráðið at fáa hesi viðurskifti ásett í virkis- og fundarskipanina fyri Leigunevndina.

MÁL NR. 24/09110

## Kunngerð um tíðaravmarkaða serskipan fyri veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2023 hevði ikki ynskiliga lóggávudygd

Klagað var um, at eitt partafelag og báturin hjá felagnum, flokkaður í bólki 5, vórðu noktað atgongd til fiskiskap á Føroyabanka í 2023. Klagan snúði seg, umframt ymisk onnur viðurskifti, um kunngerðina fyri tíðaravmarkaða serskipan fyri veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2023, sum klagarin helt vera ósakliga, órímiliga og diskriminerandi fyri klagaran.

Umboðsmaðurin helt samanumtikið, at kunngerðin ikki hevði ynskiliga lóggávudygd. Víst varð millum annað bæði til § 22, stk. 1 og stk. 2 í Sjófeingislógini sum heimild fyri kunngerðini. Umboðsmaðurin vísti á, at tá ið Løgtingið ítøkiliga hevði gjørt eina serliga áseting fyri Føroyabanka í stk. 2, vil vanlig løgfrøðilig fatan vera, at stk. 1 ikki fevnir um Føroyabanka.

Eisini vísti umboðsmaðurin á, at kunngerðin nýtti hugtakið fiskiloyvi á annan hátt enn allýst í løgtingslógini. Umboðsmaðurin helt, at tá talan var um eitt so stórt og týdningarmikið lógarøki, átti áherðsla at verða løgd á at nýta gjøgnumført orðaval fyri at skapa greidleika. Um kunngerðir við heimild í Sjófeingislógini ikki nýta somu allýsingar og hugtøk sum Sjófeingislógin, er vandi fyri, at umsitingin eftir kunngerðini ikki verður í samsvar við lógina.

Klagarin førdi fram, at bólkabýtið - tal av fiskidøgum - á landgrunninum, sum meginregla, skuldi síggjast aftur í bólkabýtinum á Føroyabanka, men umboðsmaðurin helt ikki, at hetta við neyðugum greidleika framgekk av galdandi lóg.

Umboðsmaðurin mælti Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum til at umhugsa at strika § 22, stk. 1 sum heimild í Føroyabanka kunngerðini og at vissa sær, at kunngerðir við

heimild í Sjófeingislógini taka støði í teimum allýsingum og meginreglum fyri fiskiloyvi og veiðiloyvi, sum Sjófeingislógin ásetur.

**MÁL NR. 24/09468**

## Álit um málsviðgerðina og reglugerðina hjá Runavíkar kommunu í sambandi við tillutan av grundstykkjum

Ein borgari søkti um grundstykki hjá Runavíkar kommunu í apríl 2023. Hann setti seg í samband við kommununa fleiri ferðir yvir eitt tíðarskeið fyri at fáa eitt grundstykki og bað eisini um innlit í grundstykkjalistan, og hvussu grundstykkir vórðu tillutað. Eftir at hava mint kommununa á umbønina, svaraði kommunan, at grundstykkjalistin var ikki almennur.

Í februar 2024 fekk borgarin tillutað grundstykki til hægri kostnað, sum fyri vinnufyritøkur, við teirri grundgeving, at hann átti hús í kommununi. Borgarin vísti á, at aðrir borgarar høvdu fingið tillutað grundstykki fyri lægri kostnað, hóast hesir áttu hús í kommununi, tá teir søktu um grundstykki. Hann kendi seg tí fyri mismuni og vildi verða javnmettur við aðrar borgarar í kommununi.

Eftir at hava mint kommununa á málið fleiri ferðir, sendi borgarin umboðsmanninum eina klagu.

Umboðsmaðurin helt, at reglugerðin fyri grundstykkjalistan hjá Runavíkar kommunu ikki hevði nóg greiniligar ásetingar um treytirnar fyri at fáa tillutað kommunalt grundstykki. Í reglugerðini sást millum annað ikki viðtøkan hjá Byggi- og býarskipanarnevndini um, at metti útveganarkostnaðurin skuldi rindast fyri stykkir til vinnufyritøkur til bygging av sethúsum ella líknandi. Ei heldur sóust í reglugerðini tær treytir, sum kommunan kunnaði umboðsmannin um undir klagumálsviðgerðini. Umboðsmaðurin vísti á, at ein greið reglugerð eigur at vera grundarlagið undir málsviðgerðini, og ein greið reglugerð er við til at tryggja, at mál, ið eru eins, verða viðgjørd eins.

Umboðsmaðurin kannaði umstøðurnar fyri tillutan av grundstykkjum, sum klagarin hevði víst á, og gav Runavíkar kommunu eina átalu fyri málsviðgerðina av umsókn klagarans. Umboðsmaðurin heitti eisini á Runavíkar kommunu um beinanvegin at dagføra og eftirmeta reglugerðina fyri tillutan av kommunalum grundstykkjum.

MÁL NR. 24/11241

## Álit um vantandi svar frá Vága kommunu í sambandi við eina umbøn um innlit í egið mál

Ein borgari klagaði um, at Vága kommuna ikki svaraði hansara umbøn um innlit í egið mál.

Innlitsumbønin varð send kommununi, tann 5. apríl 2024, og varð ikki svarað fyrr enn seks vikur eftir, tá ið kommunan lat umboðsmanninum frágreiðing um málið. Kommunan sendi onga kunning um, at málið ikki kundi avgreiðast innan 10 dagar og orsøkina til tess. Harumframt sást ikki av latna innlitinum, hvussu nógv skjøl vóru í málinum tilsamans.

Í mannagongdini fyri viðgerð av innlitsumbønum hjá Vága kommunu stóð, at innlitsumbønir skuldu avgreiðast innan 10 yrkadagar. Hetta var ikki í samsvar við § 16, stk. 2 í innlitslógini og fyrisitingarlógini. Teir 10 dagarnir eru ikki at skilja sum einans yrkadagar. Allir dagar telja við. Harumframt er endamálið við ásetingunum í § 16, at innlitsumbønir eiga at verða viðgjørdar við einum serligum skjótleika og ikki uttan serliga orsøk taka longri tíð, enn neyðugt er.

Í kanning hjá umboðsmanninum frá november 2023 um viðgerð av málum um alment innlit í størru kommununum hevði umboðsmaðurin mint Vága kommunu á lógarásettu krøvini til viðgerðartíð, at játtanarskriv eiga at sýna greitt, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í málinum, og um innlit verður latið í tey øll.

Umboðsmaðurin gav tí Vága kommunu eina átalu fyri handfaringina av málinum og mælti kommununi til at dagføra mannagongdina fyri viðgerð av innlitsumbønum.

MÁL NR. 24/12012

## Avmarkandi tulking av heimildunum hjá landsstýris-manninum var ikki í samsvar við býarskipanarlógina

Klagað var um, at Umhvørvismálaráðið ikki fyrisat løgtingslóg um byggi- og býarskipanir á rættan og lógligan hátt í sambandi við góðkenning av byggisamtyktum. Borgarin hevði saman við øðrum sent grundaða kæru til Umhvørvismálaráðið móti eini broyting av byggisamtykt.

Borgarin hevði ikki fingið kunnleika til broytingarnar, fyrrenn kæran varð send ráðnum. Umboðsmaðurin helt, at væntandi kunnleikin hjá borgarunum til ætlaðu broytingina, kundi bent á, at reglurnar um kunngerð av ætlaðum broytingum ikki longur livdu upp til endamálið í lógini um "víðgongdan almenning". Umboðsmaðurin mælti ráðnum til at endurskoða § 6, stk. 1 við tí fyri at eyga at nágreina, hvørji krøv, ið nútíðin setur til almanna kunngering.



Ráðið viðgjørdi ikki innihaldið í kæruni, vísandi til at freistin í býarskipanarlógini at senda inn mótmæli til kommununa var farin. Ráðið sendi heldur ikki kæruna til kommununa, tí tað ikki metti at talan var um upplýsingar, sum kundu haft munandi týdning fyri støðutakanina, ella sum kommunustýri ikki longu hevði tikið støðu til. Ráðið sendi heldur ikki kæruna til býarskipanarnevndina, sum skuldi gera ummæli til landsstýriskvinnuna av málinum.

Umboðsmaðurin vísti á, at skipanin við býarskipanarnevndini var ein liður í upplýsingarskylduni hjá Umhvørvismálaráðnum í sambandi við viðgerð og góðkenning av uppskotum til býarskipanir og byggisamtyktir. Sambært lógini og viðmerkingunum var býarskipanarnevndin, eftir umboðsmansins meting, ætlað at vera ein faklig nevnd, sum letur landsstýrismanninum faklig ummæli. Slík ummæli kundi býarskipanarnevndin ikki væntast at lata uttan at fáa nøktandi upplýsingar, um tær broytingar sum skulu gerast, um grundarlagið og orsøkina til tær.

Umboðsmaðurin helt, at mannagongdin hjá ráðnum fyri upplýsing av málum var ivasom og mælti til at hon varð endurskoðað.

At enda vísti umboðsmaðurin á, at tað, eftir hennara meting, ikki var heilt samsvar millum ásetingarnar í lógini og ta siðvenju, sum ráðið lýsti seg at hava fylgt síðstu árini viðvíkjandi heimild og skyldu hjá landsstýrismanninum í sambandi við broyting av byggisamtyktum. Umboðsmaðurin helt, at ein avmarkandi tulking av heimildunum hjá landsstýrismanninum, har eftirlitið einans viðvíkur legaliteti, ikki var í samsvar við lógina. Umboðsmaðurin ásannaði, at ráðið hevði fylgt síni avmarkandi tulking í fleiri ár, men vísti á, at um ráðið vildi halda fast við at eingin realitetsviðgerð skuldi vera í ráðnum, átti hetta at framgingið greitt av lógini, so rættarstøða borgarans er greið.

Av tí at umboðsmaðurin metti seg hava rakað við lýti í fyriskipanini hjá Umhvørvismálaráðnum av umsitingini av býarskipanarlógini, boðaði hon Løgtingi, landsstýriskvinnuni í Umhvørvismálum og Kommunufelagnum frá hesum, sambært § 12, stk. 1 í lóg um Løgtingsins umboðsmann.

**MÁL NR. 24/15211**

## Umboðsmaðurin mælti til, at komandi dagføringin av dagstovnalógini átti at lýsa og taka støði í bestu loysnini fyri Føroya børn

Ein borgari vendi sær til umboðsmannin við einari klagu um, at eitt barn, ið hevur serligar avbjóðingar, ikki fekk tilboð um frítíðarskúla, tá skúlarnir høvdu frí. Hetta var grundað á, at upplatingartíðin hjá frítíðarskúlanum, ið ásett er í dagstovnalógini, fylgdi skúlagongdini.

Klagað varð í hesum sambandi um, at ein fráboðað endurskoðan av dagstovnalógini enn ikki var komin á mál.

Klagan var eitt framhald av aðrari klagu frá februar 2023, har umboðsmaðurin tók mál upp av egnum ávum við Barna- og útbúgvingarmálaráðið um nágreining av heimildini í dagstovnalógini fyri upplatingartíðum hjá frítíðarskúlum (LUM 23/05988).

Í niðurstøðuni av málinum, dagfest 23. august 2023, var greitt, at ráðið og umboðsmaðurin ikki høvdu somu fatan av heimildini. Barna- og útbúgvingarmálaráðið kunnaði tá umboðsmannin um, at dagstovnalógin fór at verða endurskoðað í næstum.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið boðaði, í sambandi við viðgerðina av nýggju klaguni, umboðsmanninum frá, at farið nú var í gongd við at endurskoða dagstovnalógina, og úrslitið av hesum væntandi fór at verða lagt fram á vári 2025.

At arbeiðið við at endurskoða dagstovnalógina ikki var komið longri, helt umboðsmaðurin vera harmiligt. Hetta tí at tað fyri ávísar borgarar hevði alstóran týdning at kenna úrslitið av hesum arbeiði.

Umboðsmaðurin helt seg tó ikki kunna átala Barna- og útbúgvingarmálaráðið fyri nýttu málsviðgerðartíðina. Hesa fatan grundaði umboðsmaðurin á, at ráðið og umboðsmaðurin ikki vóru samd um, hvussu heimildin fyri upplatingartíðum í dagstovnalógini skuldi tulkast. Í hesum høpi metti umboðsmaðurin seg ikki kunna vísa burtur tulkingina hjá ráðnum, sum í ávísan mun kundu metast at samsvara við ta virkisfrælsi, ið sambært dagstovnalógini varð lagt til kommunurnar at skipa økið. Harafturat helt umboðsmaðurin tað ikki vera heilt greitt, hvussu viðurskiftini kring ansing fóru at verða skipaði í komandi dagføringini av dagstovnalógini. Umboðsmaðurin gav sær tó far um, at ætlanin, sambært ráðnum, var, at børn og familjur teirra skuldu uppliva eitt meiri samanhangandi tilboð.

Umboðsmaðurin gjørdi vart við týdningin av Barnarættindasáttmálanum í mun til lóggávuarbeiðið. Víst varð serliga á, at skipanarlig viðurskifti, ið fevndu um børn, eiga at hava barnsins besta fyri eyga og taka barnsins sjónarmið við.

Umboðsmaðurin mælti til, at komandi dagføringin av dagstovnalógini átti at lýsa og taka støði í bestu loysnini fyri Føroya børn, so at tilboð um tænastu og støði á hesi tænastu ikki tilvildarliga varð tengt at, hvar í landinum børnini búgva.

MÁL NR. 24/15456

## Skriv til Løgmansskrivstovuna um treytirnar sambært landsstýrislønarlógini fyri eftirløn við 60 ára aldur

Umboðsmaðurin viðgjørdi eina klagu um, at Løgmansskrivstovan ikki tulkar reglurnar um eftirløn við 60 ára aldur í landsstýrislønarlógini á rættan hátt. Umboðsmaðurin vísti á, at tulkingin hjá Løgmansskrivstovuni ikki hevði tikið atlit at øllum viðkomandi tulkingarmøguleikum í landsstýrislønarlógini, og heitti tí á Løgmansskrivstovuna um at taka málið upp til nýggja viðgerð.
Klaga varð um, at Løgmansskrivstovan hevur tulkað reglurnar um eftirløn til landsstýrismenn við 60 ára aldur í landsstýrislønarlógini á slíkan hátt, at klagarin ikki hevði rætt til eftirløn við 60 ára aldur.

Víst varð í hesum sambandi á skriv frá Løgmansskrivstovuni, har lagt varð til grund, at ár í aldri og starvstíð, sum vóru aftaná 2015, ikki kundu teljast við í útrokningini eftir § 3 stk. 2 í landsstýrislønarlógini. Klagarin metti, at hendan tulkingin var skeiv.

Umboðsmaðurin vísti á, at eftirlønarskipanin hjá landsstýrismonnum varð broytt í 2015, soleiðis at farið var frá eini tænastumannalíknandi eftirlønarskipan til eina skipan, sum líkist teirri skipan, sum er vanlig hjá alment settum starvsfólkum, sum ikki eru tænastumenn. Tá varð samstundis gjørd ein skiftisskipan fyri landsstýrismenn, sum sita ella hava sitið sum landsstýrismenn. Skiftisskipanin varð tó avmarkað av orðingini: "Eftirlønaraldurin hjá landsstýrismanninum hækkar tó ikki eftir nevnda dag".

Lógarbroytingin, tilhoyrandi kunngerð og forarbeiðið til lógarbroytingina góvu ikki eitt heilt greitt svar uppá, hvussu reglurnar um skiftisskipanina skuldu skiljast. Møguleiki tyktist vera fyri at tulka orðingina um skiftisskipanina soleiðis, at orðingin "eftirlønaraldurin hjá landsstýrismanninum hækkar tó ikki eftir nevnda dag" kundi vísa til § 3 stk. 2 í landsstýrislønarlógini og harvið fastlæsa útrokningina, sum avgerð sjálvan rættin til pensjón. Møguleiki tyktist eisini vera fyri, at tulka orðingina soleiðis, at ávísingin vísti til § 3 stk. 3, sum einans fastlæsir støddina á pensjónini, sum kann útgjaldast.

Vísandi til ivan, sum var í málinum, og at Løgmansskrivstovan, sambært málsskjølunum, ikki hevði viðgjørt spurningin um, hvørt orðið "eftirlønaraldurin" kundi víst til ásetingina í § 3 stk. 3 heldur enn til ásetingina í § 3 stk. 2, og at hetta kundi verið avgerandi fyri eftirlønarviðurskiftini hjá viðkomandi landsstýrismanni, heitti umboðsmaðurin á Løgmansskrivstovuna um at taka málið til nýggja viðgerð.

Umboðsmaðurin bað Løgmansskrivstovuna lata seg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

*Uppfylging*
*Tann 26. november 2024 kunnaði Løgmansskrivstovan umboðsmannin um, at málið nú er viðgjørt av nýggjum, og eisini mett við atliti at ásetingina í § 3 stk. 3 í*

*landsstýrislønarlógini. Víst varð til nýggja meting frá uttanhýsis ráðgeva og við støði í hesum fasthelt Løgmansskrivstovan avgerðina, sum áður var fráboðað klagaranum.*

*Tann 3. desember 2024 boðaði advokatur klagarans frá, at klagarin var ikki samdur í niðurstøðuni hjá Løgmansskrivstovuni, og at hann ynskti at gera viðmerkingar til málið, áðrenn umboðsmaðurin gjørdi eina endaliga niðurstøðu um málið. Málið var ikki avgreitt við árslok.*

**MÁL NR. 24/17345**

## Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið átti ikki at strika upplýsingar í einum innlitsmáli uttan eina ítøkiliga meting um heimild fyri undantøku

Kringvarp Føroya hevði biðið um innlit í alt tilfar viðvíkjandi einum felagi, ið hevði fingið játtað kvotu til vinnuligar fiskiroyndir eftir svartkjafti.

Ráðið gav í fyrstu syftu avmarkað alment innlit við tað, at ávís skjøl vórðu undantikin, eins og upplýsingar vórðu strikaðar í teimum latnu skjølunum, uttan at nærri varð greitt frá grundgevingini.

Klagari kærdi avgerðina og bað um, at ávísar útstrikingar skuldu takast burtur, ella at ein ítøkilig grundgeving varð givin.

Ráðið spurdi seg fyri hjá felagnum, sum innlitið snúði seg um. Felagið helt ikki, at innlit átti at verða latið í ávísu upplýsingarnar. Ráðið avgjørdi síðani, uttan at kanna umstøðurnar nærri, at nokta innlit í ávísu upplýsingarnar vísandi til, at talan var um rakstrar- og vinnuviðurskifti.

Umboðsmaðurin spurdi ráðið, hvørja ítøkiliga meting ráðið hevði gjørt sær av vandanum fyri fíggjarligum missi, um ávísu upplýsingarnar vórðu latnar.

Ráðið svaraði m.a., at tá talan var um innlitsmál, sum vóru stór í vavi og innihildu lutfalsliga nógvar upplýsingar, var mannagongdin hjá ráðnum at strika allar upplýsingar, sum kundu hava fíggjarligan miss við sær, uttan at ráðið í øllum førum hevði neyvt grundarlag fyri hesum. Ráðið heitti síðani á viðkomandi um at venda aftur, um ynski var um innlit í meira.

Ráðið ásannaði í hesum føri, at tað ikki hevði havt nøktandi grundarlag fyri at taka støðu til hesar upplýsingar, og var sinnað at viðgera málið av nýggjum.

Vísandi til § 12, stk.1, nr. 2 í innlitslógini, vísti umboðsmaðurin á, at treytin fyri at undantaka upplýsingar um rakstrar- og vinnuviðurskifti var, at tað ítøkiliga var mett

at vera stórur vandi fyri fíggjarligum missi fyri tey virki, upplýsingarnar viðvíkja, um innlit varð latið. Tað var tí ikki í samsvari við innlitslógina, um ráðið strikaði upplýsingar uttan eina ítøkiliga meting av, um upplýsingarnar vóru fevndar av ávísari undantøku í innlitslógini. Umboðsmaðurin helt tí ikki nevndu mannagongdina hjá ráðnum vera í samsvari við innlitslógina.

Umboðsmaðurin tók til eftirtektar, at ráðið vildi taka málið uppaftur, og mælti ráðnum til at endurskoða mannagongd sína fyri viðgerð av innlitsmálum, sum eru stór í vavi og innihalda lutfalsliga nógvar upplýsingar.

*Uppfylging*
*Seinni boðaði ráðið umboðsmanninum frá, at nýggj avgerð varð tikin og send klagaranum, og at arbeiði við at endurskoða mannagongdir í sambandi við innlitsmál var sett á skrá.*
*Nýggj klaga varð síðani latin umboðsmanninum um seinnu avgerðina, tí klagarin ikki metti seg hava fingið fult innlit. Tann klagan var ikki endaliga avgreidd við árslok.*


Vikmar
effo

# 5 Frágreiðingar

Umboðsmaðurin kann taka mál upp av egnum ávum og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av sínum virkisøki. Hann hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

Umboðsmaðurin kann kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varugur við viðurskifti, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin gerst varugur við viðurskifti, sum ikki beinleiðis er klagað um, men sum hann ynskir at kanna nærri.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur kannað og skrivað eina frágreiðing um.

MÁL NR. 23/18132

## Eftirlitsvitjanir á stovnum, sum veita umlætting til børn, ið ikki eru undir barnavernd

Sum liður í virksemi umboðsmansins á barnaøkinum gjørdi Løgtingsins umboðsmaður við árslok 2023 av at fremja eftirlitsvitjanir á stovnum, sum veita umlætting til børn, ið ikki eru undir barnavernd.
Umboðsmaðurin fekk upplýst frá Almannaverkinum, at umlætting, sambært § 41 í lóg um almannatrygd og tænastur (løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur), verður m.a. veitt á ymsum umlættingarstovnum hjá Almannaverkinum. Harafturat er umlættingarheimið Dáin í Klaksvík, sum er ein sjálvsognarstovnur, ið veitir umlætting til børn og vaksin og frítíðartilboð til børn, sambært omanfyri nevndu lóg.

Áðrenn eftirlitsvitjanina hevði umboðsmaðurin havt fundir við umboð fyri Javna og barnaserkønan sálarfrøðing. Endamálið við hesum fundum var, at umboðsmaðurin fekk kunning um viðurskifti, sum vanliga gera seg galdandi hjá teimum børnum, ið hava tørv á umlætting, og um møgulig serlig viðurskifti, sum umboðsmaðurin skuldi hava fokus á.

Umboðsmaðurin gjørdi av í hesum umfari at vitja:
- umlættingarheimið Dáan í Klaksvík, tann 13. desember 2023
- dag- og umlættingarstovnin Mýrisóljan í Runavík, tann 23. apríl 2024
- dag- og umlættingarstovnin Dreymsóljan, tann 28. oktober 2024

Eftirlitsvitjanirnar tóku m.a. útgangsstøði í hesum lógum:
- Løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur.

- Løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin.
- Bekendtgørelse nr. 6 af 16. januar 1992 om FN-konvention af 20. november 1989 om Barnets Rettigheder (Barnarættindasáttmálin)
- Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2009 om FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap (Breksáttmálin)

Á eftirlitsvitjanunum legði umboðsmaðurin harumframt dent á at lýsa gerandisdagin hjá børnunum, ið vóru á stovni. Í hesum sambandi vórðu m.a. hesi viðurskifti umrødd:

- Samansetingin av borgarum á stovnstilboðnum
- Virkisætlanir fyri børnini, ið eru í umlætting á stovnunum
- Skráseting og skjalfesting hjá starvsfólki í sambandi við umlættingina
- Dátuvernd
- Tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin
- Hølisumstøður

Í sambandi við eftirlitsvitjanirnar varð eitt skriv sent til stovnarnar, har umboðsmaðurin kunnaði tey avvarðandi um vitjanina og um møguleikan at fáa eina samrøðu við umboðsmannin. Eisini stóð í skrivinum, at starvsfólk høvdu høvi at tosa við umboðsmannin, um tørvur var á tí. Ongi starvsfólk høvdu tó tikið av hesum tilboði í sambandi við hesar eftirlitsvitjanir.

Eftirlitsvitjanirnar vórðu skipaðar soleiðis, at umboðsmaðurin hevði fund við leiðsluna og ávís lyklastarvsfólk á stovnunum, umboðsmaðurin varð vístur runt á stovnunum og hevði harumframt fund við avvarðandi. At enda var samrøða við leiðsluna, har tikið varð samanum dagin.

Umboðsmaðurin hevur gjørt frágreiðingar frá hesum trimum eftirlitsvitjanum.

Umlættingarheimið Dáin, dag- og umlættingarstovnurin Mýrisóljan, dag- og umlættingarstovnurin Dreymsóljan, Almannaverkið og Almanna- og mentamálaráðið hava fingið høvi at gera viðmerkingar til frágreiðingarnar.

Nú frágreiðingarnar eru lidnar, eru tær sendar nevndu myndugleikum, Javna, Barna- og útbúgvingarmálaráðnum og Løgtinginum.

Frágreiðingarnar eru grundarlag undir teimum samandráttum, ið kunnu lesast í fylgiskjølunum 1-3, har tikið verður samanum frá vitjanunum, og hvørjar viðmerkingar og tilmæli umboðsmaðurin hevur givið.

## Samandráttur av teimum mest týðandi viðmerkingunum og tilmælunum frá umboðsmanninum

### Tvingsil og harðskapur

Í sambandi við tí einu eftirlitsvitjanina kom fram, at Tvingsilsnevndin (nú Føroya Kærustovnur) ikki hevði góðkent eitt tilmæli frá Almannaverkinum um nýtslu av hjálparráði til eitt barn á stovninum.

Hóast hetta, so greiddi leiðslan á stovninum frá, at tey vegna vantandi starvsfólkaorku ikki høvdu verið før fyri at laga seg eftir avgerðini og høvdu hildið áfram at nýta inntrivið.

Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at neyðuga starvsfólkaorkan hevði vantað líka síðan avgerðina hjá Tvingsilsnevndini, og at Almannaverkið og stovnurin bæði vórðu kunnaði um avgerðina hjá Tvingsilsnevndini, tá hon fall.

Umboðsmaðurin helt, tað var givið, at myndugleikar skipaðu síni viðurskifti soleiðis, at teir vóru førir fyri at lýða og laga seg eftir avgerðum hjá Føroya Kærustovni (fyrrv. Tvingsilsnevndini).

Umboðsmaðurin helt tað vera atfinningarsamt, at Almannaverkið, ið hevði verið vitandi um støðuna hjá stovninum viðvíkjandi inntrivinum, ið helt áfram, ikki beinanvegin tók neyðug stig til tess at skipa viðurskiftini øðrvísi, samsvarandi avgerðini hjá Tvingsilsnevndini (nú Føroya Kærustovni). Umboðsmaðurin heitti á Almannaverkið um framyvir at tryggja sær, at avgerðir um inntriv frá Føroya Kærustovni verða lýddar.

**Flutningstænasta**
Á tí einu eftirlitsvitjanini greiddi eitt foreldur umboðsmanninum frá, at flutningstænasta til teirra barn, ið hevði fjølbrek, vantaði. Støðan hevði elvt til, at foreldrini sjálvi vóru noydd at taka sær av flutninginum millum skúla og stovn hjá barninum. Hetta hevði avleiðingar fyri, hvussu foreldrini vóru før fyri at røkja eitt vanligt arbeiði, tá tey noyddust at seta tíð av til flutning í arbeiðstíð.

Grundað á hesar upplýsingar frá foreldrinum, bað umboðsmaðurin Almanna- og mentamálaráðið og avvarðandi kommunu um at greiða frá, hvørjar heimildir vóru kring flutningstænastu, og hvussu tænastan varð útint í sambandi við, at borgarar nýta tænastur, sambært kap. 5 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur.

Umboðsmaðurin vísti á eitt tilmæli um flutningstænastu, ið landsstýrið lat úr hondum í 2017, har mælt varð til, at flutningur varð partur av tænastuni í sambandi við, at ein borgari fekk dagtilboð ella líknandi dagliga tænastu uttanfyri heimið.

Sambært frágreiðingini frá Almanna- og mentamálaráðnum, kundi umboðsmaðurin staðfesta, at hóast heimild fyri flutningstænastu var ásett í omanfyrinevndu lóg um almannatrygd og tænastur, so var kunngerð um nærri skipan av flutningstænastu ikki sett í verk vegna vantandi játtan á fíggjarlógini.

Sambært frágreiðingin frá avvarðandi kommunu, kundu umboðsmaðurin staðfesta, at kommunan ikki sá tað sum eina kommunala uppgávu at veita flutningstænastu tvørtur um kommunumørk fyri tænastur, ið vóru skipaðar í omanfyrinevndu lóg um almannatrygd og tænastur.


BRANDCENTRAL
DREYMSÓLJAN

Umboðsmaðurin vísti í hesum sambandi til grein 20 í Breksáttmálanum, ið sigur, at limalondini skulu taka munadygg stig til at tryggja persónligt flytføri við størst møguligum sjálvbjargni hjá fólki, ið bera brek m.a. við at lætta um flytiførið á tann hátt og til ta tíð, tey ynskja og fyri ein rímiligan kostnað.

Umboðsmaðurin helt, at tað ikki var nøktandi, at ongi stig vóru tikin til at fáa flutningstænastu skipaða, samsvarandi tilmælinum frá 2017, og helt, at tað var ørkymlandi at persónliga flytføri hjá einum barni til eina neyðuga og visiteraða tænastu ikki var tryggjað, við tí úrsliti, at foreldrini at barninum máttu átaka sær eina uppgávu, ið landið, sambært tilmælinum, átti at átikið sær, samsvarandi grein 20 í Breksáttmálanum.

Umboðsmaðurin heitti á Almanna- og mentamálaráðið um skjótast gjørligt at taka støðu til, um flutningstænasta, sambært § 43, stk.1 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, skuldi setast í verk. Umboðsmaðurin gav í hesum høpi gætur, at sjey ár nú vóru liðin síðan tilmælið varð latið landsstýrismanninum í 2017, og at lógin um almannatrygd og tænastur  nú hevði fýra ár á baki.

**Verja av privatlívi**

Á einari eftirlitsvitjan spurdi umboðsmaðurin leiðsluna, hvussu stovnurin tryggjaði sær, at óviðkomandi ikki fóru inn til barnið, meðan barnið var einsamalt í kamarinum um dagin og um náttina, tá tað svav.

Til hetta svaraði leiðslan, at stovnurin hevði sovandi náttarvakt, og at náttarvaktin svav tætt við kamarið hjá barninum við opnari hurð. Leiðslan metti, at um onkur ætlaði sær inn í kamarið hjá barninum, so vaknaði náttarvaktin. Leiðslan legði afturat, at starvsfólkini kendu brúkarabólkin, ið var til døgnumlætting samstundis sum barnið, og mettu tey, at ongin vandi var á ferð, hvørki um dagin ella náttina, í mun til tað, ið umboðsmaðurin spurdi um.

Umboðsmaðurin heitti á stovnin um at tryggja sær, at tann fyriskipan, ið var kring barnið, til allar tíðir var trygg fyri barnið, bæði tá barnið búleikaðist í felagshølunum og var einsamalt í sínum kamari. Umboðsmaðurin hevði við hesum viðmerkingum í huga, at stovnurin bæði hýsti børnum og vaksnum.

**Skúlagongd**

Í sambandi við eina eftirlitsvitjan greiddi leiðslan frá, at tvey av børnunum vóru í skúlaaldri, men at skúlatilboðið til teirra ikki var klárt enn.

Sambært kunngerðini á økinum verða serflokkur skipaðir sum serligt skipað undirvísingartilboð undir skúlaleiðsluni í tí skúla, har serflokkurin er staðsettur og við sernámsfrøðiligari ráðgeving frá Sernámi. Í hesum føri var talan um sernámsfrøðiliga tilboðið “Pallin”, ið Sørvágs skúli varðaði av.

Umboðsmaðurin bað eftirfylgjandi Undirvísingarstýrið um at greiða frá støðuni og orsøkini til, at skúlatilboðið ikki var klárt til skúlaárið 2024/25.

Undirvísingarstýrið ásannaði í svarið sínum, at skúlatilboðið ikki var klárt til skúlaárið 2024/25, men vísti á, at sjálv skúlagongdin var undir uppbygging og varð ment so hvørt, inntil skúlatilboðið eftir ætlan væntandi varð heilt klárt til skúlaárið 2025/26.

Undirvísingarstýrið ásannaði eisini, at tilgongdin átti at gingið skjótari, og at ov long tíð var fráliðin við ov fáum avgerðum. Í hesum høpi metti Undirvísingarstýrið, at tað í málum um skúlagongd hjá børnum, ið bera brek, kundi tænt eini skjótari og tryggari tilgongd, um Undirvísingarstýrið var virkið í visiteringini og hevði eitt slag av savnandi fyrisitingarligari uppgávu millum fleiri partar, har felags loysnir vóru neyðugar. Undirvísingarstýrið upplýsti, at sambært kunngerðini á økinum, hevði stýrið ikki møguleika at vera virkið í visiteringini, og at hetta tí fór at krevja broytingar í kunngerðini.

Í sambandi við skúlagongd hjá børnum, ið bera brek, vísti umboðsmaðurin á art. 23 og 28 í Barnarættindasáttmálanum og art. 24 í Breksáttmálanum. Felags fyri hesar sáttmálaásetingar er, at tær skipa rættindi hjá børnum at fáa eina munagóða frálæru, uttan mun til teirra brek, og verða stuðlaði soleiðis, at tey kunnu ganga í skúla saman við børnum, ið ikki bera brek.

Umboðsmaðurin helt, tað ikki vera nøktandi, at avvarðandi myndugleikar ikki høvdu borið seg skjótari at í tilgongdini at gera eitt nøktandi skúlatilboð til børnini, soleiðis at hesi kundu byrja sína skúlagongd um somu tíð sum onnur javnaldrandi børn.

Umboðsmaðurin tók undir við Undirvísingarstýrinum at fáa viðurskiftini skipaði øðrvísi og heitti á Barna- og útbúgvingarmálaráðið um skjótast gjørligt at taka neyðug stig til at tryggja, at børn, ið bera brek, altíð kunnu byrja sína skúlagongd samstundis sum børn um sama aldur byrja teirra skúlagongd. Umboðsmaðurin helt, at tað var av alstórum týdningi, at skúlagongd hjá børnum, ið bera brek, samsvaraði við omanfyrinevndu sáttmálaásetingar í Barnarættindasáttmálanum og Breksáttmálanum.

**Hølisumstøður**

Á tí einu eftirlitsvitjanini hevði umboðsmaðurin nakrar viðmerkingar og tilmæli knýtt at hølisumstøðunum. Sum heild helt umboðsmaðurin, at umstøðurnar vóru góðar. Hølini vóru hugnalig, rúmlig og sýntust væl viðlíkahildin.

Umboðsmaður helt, at felagshølini høvdu eitt munandi afturljóð, ið nervaði uppihaldið í rúminum óneyðugt. Nógv av børnunum høvdu tørv á maskinum, ið góvu ljóð frá sær, sum síðani eisini elvdi til afturljóð. Umboðsmaðurin helt eisini, at vanligar samrøður góvu eitt afturljóð.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at kømrini kundu havt ein meiri barnsligan dám við lutum, ið vanliga verða settir í samband við eitt barnakamar, eitt nú litt ljós, myndir ella bøkur. Í hesum høpi umrøddi leiðslan og umboðsmaðurin avbjóðingina at skipa stovnin soleiðis, at hann bæði kundi rúma málbólkinum autismu og fjølbreki, ið hava sera ymiskar tørvir og avmarkingar.

Leiðslan vísti eisini á, at baðirúmið yvir av uppihaldsrúminum í dagtilboðnum hevði eitt skiftiborð, ið var sett fast móti vegginum, meðan vaski var burturfrá á einum øðrum veggi. Leiðslan vísti á, at antin skuldi vaskið verið flutt tættari at skiftiborðinum, ella skuldi talan verið um eitt flytandi skiftiborð.

Umboðsmaðurin mælti til, at stovnurin tók stig til at gera kømrini meira barnavinarlig ella heimlig fyri barnið, við lutum, ið vanliga verða settir í samband við eitt barnakamar, eitt nú ljós, myndir ella bøkur. Umboðsmaðurin fekk ta fatan, eftir samrøður við avvarðandi, at børnini høvdu ljós og leikur á kamarinum heima.

Umboðsmaðurin mælti eisini til, at Almannaverkið í samráð við stovnin fór at gera arbeiðsumstøðurnar í baðirúminum meiri arbeiðsligar, soleiðis at vask og skiftiborð vóru tættari hvør at øðrum.

Umboðsmaðurin mælti harafturat til, at Almannaverkið, í samráð við stovnin, skjótast gjørligt fór at kanna, um okkurt kundi gerast við afturljóðið í felagsrúminum, ið nervaði uppihaldið óneyðugt.

**MÁL NR. 24/02998 og 24/11977**

## Eftirlitsvitjanir á røktarheimum

Umboðsmaðurin hevur verið á eftirlitsvitjanum á tveimum røktarheimum, sum hava deildir til fólk við demens.
Eftirlitsvitjaninar á røktarheimunum vórðu rættaðar móti støðuni hjá persónum við týðandi sálarligum virkistarni, demens, sum búgva á stovni, teirra sjálvsavgerðarrætti og inntrivum, sum tey ikki geva ella hava førleikar at geva samtykki til.

Áðrenn vitjanirnar hevði umboðsmaðurin fund við Demensklinikkina á Landssjúkrahúsinum fyri at kunna seg um, hvussu demensøkið var skipað. Eisini var fundur við Alzheimerfelagið fyri at fáa kunning um, hvat felagið hevði at viðmerkja um støðuna hjá persónum við demens, sum búgva á stovni.

Fyribils hevur umboðsmaðurin verið á eftirlitsvitjan á hesum røktarheimum:

- demensdeildini, Handarastovu á Lágargarði, 19. mars 2024
  Heilsu- og umsorganartænastan hjá Tórshavnar kommunu
- demensdeildini, Suðurstovu á Eysturoyar ellis- og røktarheimi, 24. juni 2024
  Roðin – økistænastan fyri Runavíkar-, Nes- og Sjóvar kommunu

Demensdeildirnar eru deildir í kommunalum røktarheimi og tí fevndar av Eldralógini.

Eftirlitsvitjaninar tóku m.a. útgangsstøði í hesum lógum:
- Eldralógini, lóg nr. 19 frá 7 apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
- Tvingilslógini, lóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin
- Verjumálslógini, anordning nr. 397 frá 20. apríl 2021 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven
- Lógini um framtíðarfulltrú, lóg nr. 157 frá 10. desember 2021 um framtíðarfulltrú

Á vitjanunum legði umboðsmaðurin harumframt dent á at lýsa gerandisdagin hjá búfólkunum. Í hesum sambandi vórðu m.a. hesi viðurskifti umrødd:
- dagligdagin á deildini, m.a. tiltøk, ítriv og o.a. fyri virkni, trivna og umsorgan
- sambond (relatiónir) og samskifti við tey avvarðandi
- sjálvsavgerðarrættur, samtykki, verjumál, framtíðarfulltrú og fíggjarviðurskifti
- trygd, tvingsil og onnur inntriv, valdsnýtsla v.m.

Áðrenn vitjanina vórðu búfólk og teirra avvarðandi kunnaði um, at umboðsmaðurin kom á eftirlitsvitjan, og at tey, sum ynsktu tað, høvdu møguleika at tosa við umboðsmannin.

Eftirlitsvitjaninar vórðu skipaðar soleiðis, at byrjað varð við einum fundi við leiðsluna og umboð fyri starvsfólkini. Eftir fundin varð víst runt á deildini. Síðani tosaði umboðsmaðurin við búfólk, avvarðandi og starvsfólk, sum ynsktu samrøðu við umboðsmannin. At enda var samrøða við leiðsluna, har tikið varð samanum dagin.

Umboðsmaðurin hevur gjørt frágreiðingar frá hesum báðum eftirlitsvitjanunum.

Heilsu- og umsorganartænastan hjá Tórshavnar kommunu og Roðin, økistænastan fyri Runavíkar-, Nes- og Sjóvar kommunu, hava fingið høvi at gera viðmerkingar til frágreiðingina. Nú frágreiðingarnar eru lidnar, eru tær sendar nevndu myndugleikum, Demensklinikkini, Alzheimerfelagnum, landsstýriskvinnuni í almannamálum (Eldralógin), landsstýrismanninum í lógarmálum (Tvingsilslógin), landsstýriskvinnuni í heilsumálum (kommunulæknaskipanin) og Løgtinginum.

Umboðsmaðurin hevur eisini sent landsstýrismanninum í lógarmálum (Tvingsilslógin) og landsstýriskvinnuni í almannamálum (Eldralógin) kunnandi skriv um staðfestingarnar í mun til Tvingsilslógina og um, at enn mangla reglur um eftirlit á eldraøkinum (sí fylgiskjal 3).

Frágreiðingarnar eru grundarlag undir teimum samandráttum, sum kunnu lesast í fylgiskjølunum 1-2 ( sum eru á heimasíðu umboðsmansins), har tikið verður samanum frá vitjanunum, og hvørji tilmæli umboðsmaðurin hevur givið.

## Her er stutt samanskriving av viðmerkingum og tilmælum frá umboðsmanninum

**Um dagligdagin á deildunum**
Hóast demensdeildirnar vóru í hølum, sum upprunaliga ikki vórðu bygd til fólk við demens, var tað samanumtikið fatanin hjá umboðsmanninum, at við teimum broytingum, sum vórðu gjørdar eftir tørvi, so var talan um demensdeildir, ið høvdu rímiliga góðar karmar til sítt virksemi, og at í innrættingini var eisini roynt at taka atlit at, at talan var um búfólk við demens. Eisini var tað fatanin hjá umboðsmanninum at hóast ynski var um at fáa fleiri starvsfólk við viðkomandi útbúgving, so hevði verandi starvsfólkahópur neyðuga fakligheit at taka sær av búfólkunum. Arbeiðið tyktist væl skipað. Tænastan og umsorganin varð veitt við denti á, at talan var um búfólk, sum hava demens av ymiskum slagi, at halda tey virkin eftir evni, eins og at geva teimum innihaldsríkar dagar.

Tey avvarðandi, sum tosaðu við umboðsmannin, vóru samanumtikið væl nøgd við tænastuna, ið stovnurin veitti búfólkunum. Avvarðandi vístu tó á, at tíðin, áðrenn teirra familjulimur hevði fingið búpláss, hevði verið sera ørkymlandi og strævin, tí óvissa hevði verið um so nógv viðurskifti.

**Viðvíkjandi sambondum (relatiónir)**
Vitjanirnar góvu umboðsmanninum ta fatan, at demensdeildirnar skapa góðar møguleikar fyri at búfólk og teirra avvarðandi kunnu hava tætt samband, hóast bústaðurin er á einum stovni.

**Samstarvsráð**
Á tí eina røktarheiminum varð upplýst, at samstarvsráðið ikki var aktivt í løtuni. Sambært § 15 í Eldralógini, var eitt lógarkrav, at velja eitt samstarvsráð á hvørjum røktarheimi, sum hevur til endamáls at tryggja samstarvið millum búfólk, avvarðandi og heimið. Umboðsmaðurin heitti tí á stovnin um at velja og skipa eitt samstarvsráð fyri stovnin.

**Sjálvsavgerðarrættur og samtykki, verjumál, framtíðarfulltrú og fíggjarviðurskifti**
Staðfestast kundi, at verjumálini vóru fá, og tey snúðu seg bert um fíggjarviðurskiftini. Fíggjarviðurskiftini millum búfólk og stovn vórðu skipað eftir føstum og greiðum leisti, og fíggjarviðurskiftini góvu annars ikki stórvegis trupulleikar.

Eingin av búfólkunum høvdu gjørt framtíðarfulltrú. Við framtíðarfulltrú kann ein persónur sjálvur velja, hvør skal umboða seg, um viðkomandi ikki fær tikið sær av sínum fíggjarligu og/ella persónligu viðurskiftum longur orsakað av sjúku, viknaðum sinnisligum virkisføri, viknaðari heilsu ella líknandi.

Øll búfólkini høvdu sostatt sjálvsavgerðarrætt, og var hetta nakað starvsfólkini tóku atlit at í sambandi við veiting av røkt og umsorgan yvirfyri einstaka búfólkinum.



**Viðvíkjandi trygd, harðskapi, valdsnýtslu og tvingsil**
Demensdeildirnar høvdu skipanir um fráboðan av valdsnýtslu og harðskapi, og starvsfólkini høvdu fingið skeið í at handfara tvístøður og harðskapsstøður. Staðfest varð, at tað kom nærum ikki fyri, at fysiskur harðskapur var á hesum deildum, men at onkuntíð kundi orðalagið gerast í so hóttandi. Umboðsmaðurin mælti í hesum sambandi til, at starvsfólk eisini fáa læring í at handfara og at steðga verbalum harðskapi.

Í sambandi við eftirlitsvitjaninar hevði umboðsmaðurin kunnað seg um, í hvønn mun stovnarnir, í tíðarskeiðnum síðani 2021, tá Tvingsilslógin kom í gildi, og til og við 2023, høvdu søkt Kærustovnin um góðkenning til tvingsilsinntriv.

Undir vitjanunum kundi staðfestast, at inntriv í eginfrælsið, sum krevja góðkenning frá Kærustovninum, so sum serlig upplatingarskipan til hurð, serlig hurðahondtøk, ávaringarskipanir og peiliskipanir í nøkrum førum vóru sett í verk uttan góðkenning.

Umboðsmaðurin undraðist á, at stovnarnir ikki høvdu ráðført seg meira um, hvat kravdist fyri at seta slík inntriv í verk, ella høvdu tikið stig til at søkja góðkenning til inntrivini fyrr enn í sambandi við vitjanina frá umboðsmanninum.

Umboðsmaðurin vísti á, at inntriv, sum eru tvingsil, sambært Tvingsilslógini, krevja góðkenning.  Hóast tvingsil í serligum førum kann sýnast at verða neyðugur fyri at veita nøktandi røkt og umsorgan til búfólk, sum hava demens, so skal altíð gerast ein ítøkilig meting av støðuni hjá einstaka búfólkinum. Inntrivini eiga at verða rættaði móti einstaka búfólkinum og ikki øllum búfólkunum sum ein samlað eind.

**Viðvíkjandi starvsfólkum sum ikki tosa/skilja føroyskt**
Nøkur avvarðandi góvu til kennar ávísan ótryggleika av, at starvsfólk vóru á vakt, sum ikki skiltu ella tosaðu føroyskt. Frá leiðsluni á viðkomandi stovni varð greitt frá, at nøkur starvsfólk vóru, sum ikki skiltu ella tosaðu føroyskt, men at tey vóru tilvitaði um, at hesi skuldu arbeiða saman við fólki, sum tosa føroyskt. Leiðslan helt tískil, at hetta var ikki nakar aktuellur trupulleiki.
Umboðsmaðurin vísti í hesum sambandi á, at fyri búfólkini og trygdina á stovnunum, er týðandi, at tað altíð eru starvsfólk til staðar á deildini, sum kunnu samskifta á máli, sum búfólkini skilja.

**Myndugleikasamstarv**
Undir vitjanunum varð samstarvið millum Demensklinikkina á Landssjúkrahúsinum og kommunulæknaskipanina umrøtt.
Stovnarnir søgdu seg fáa góða hjálp og ráðføring frá Demensklinikkini, tá tey høvdu tørv á tí.
Á báðum stovnunum var ynski um at fáa fastan kommunulækna til stovnin, ella at læknar komu meira út á stovnin, deils tí hetta hevði givið eina betri tænastu, men eisini fyri ikki at brúka so nógv tíð uppá at samskifta og koyra, sum tey gera í dag.
Báðir stovnarnir viðmerktu, at tørvur var á einum eldralækna.

MÁL NR. 24/01298

## Skriv frá Løgtingsins umboðsmanni, dagfest 1. november 2024, til Løgmálaráðið og Almannamálaráðið viðvíkjandi eldraøkinum, herundir Eldralógini og Tvingsilslógini

Umboðsmaðurin hevur verið á eftirlitsvitjan á tveimum røktarheimum, sum hava deildir til fólk við demens.

Eftirlitsvitjaninar á røktarheimunum vórðu rættaðar móti støðuni hjá persónum við týðandi sálarligum virkistarni, demens, sum búgva á stovni, teirra sjálvsavgerðarrætti og inntrivum, sum tey ikki geva ella hava førleikar at geva samtykki til.

Í sambandi við eftirlitsvitjaninar kunnaði umboðsmaðurin seg um, í hvønn mun stovnarnir, í tíðarskeiðnum síðani 2021, tá tvingsilslógin kom í gildi, og til og við 2023, høvdu søkt Kærustovnin um góðkenning til tvingsilsinntriv. Umboðsmaðurin hefti seg í hesum sambandi við, at tað einamest var Almannaverkið, sum søkti um góðkenning til inntriv, sambært Tvingsilslógini, meðan tað vóru merkisverda fáar umsóknir um góðkenning av inntrivum frá kommunalu stovnunum á eldraøkinum.

Undir eftirlitsvitjanunum kundi staðfestast, at inntriv í eginfrælsið, sum krevja góðkenning frá Kærustovninum, so sum serligar upplatingarskipanir, ávaringarskipanir og peiliskipanir í nøkrum førum vórðu sett í verk uttan góðkenning. Víst verður til hjáløgdu frágreiðingar, sum lýsa hesi viðurskifti.

Umboðsmaðurin fekk ta fatan, at orsøkin til at stovnarnir ikki høvdu søkt um góðkenning av inntrivunum var, at stovnarnir ikki høvdu verið við á fyrireikingunum at seta Tvingsilslógina í gildi, og tí í byrjanini ikki høvdu greiða fatan av skipanini, og at tey hildu, at góðkenningarskipanin í Tvingsilslógini (lóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin) var umsitingarliga trupul og tíðarkrevjandi. Eisini hildu tey, at Tvingsilslógin burdi verið eftirmett. Í hesum sambandi varð víst á, at síðani Tvingsilslógin varð sett í gildi í Føroyum, hevur man í Danmark gjørt broytingar á hesum øki, so m.a. nýtsla av ávaringarskipanum og peiliskipanum til dement fólk undir ávísum umstøðum, ikki verður bólkað sum tvingsilsinntriv, men sum ein partur av umsorganini.

Viðmerkjast skal, at á fundi, sum umboðsmaðurin hevði við Alzheimerfelagið, áðrenn eftirlitsvitjaninar, viðmerkti felagið eisini, at tey hildu, at galdandi lóg um Tvingsil trongdi til eina dagføring, so viðurskiftini gjørdust meir smidlig. Víst varð m.a. á, at tørvur er á, at vælferðartøkni, sum stuðlar undir trygdina og harvið kann geva størri frælsi til fólk við demens, burdi verið partur av umsorganin, uttan at hetta skuldi viðgerast sum inntriv, sambært Tvingsilslógini.

Kærustovnurin er í nøkrum førum góðkenningarmyndugleiki og í nøkrum førum

kærumyndugleiki í mun til inntriv, sambært Tvingsilslógini, men Kærustovnurin hevur ikki eftirlit við, um stovnar, sum fyriskrivað í Tvingsilslógini, søkja góðkenning til tvingsilsinntriv. Tað er landsstýrismanninum í lógarmálum, sum hevur Tvingsilslógina sum umsitingarøki. Einki er ásett í Tvingsilslógini um eftirlit.

Virksemið hjá røktarheimum fyri eldri er undir ábyrgd hjá avvarðandi kommunu, og tænasturnar skulu veitast samsvarandi Eldralógini (lóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.). Í § 19 í Eldralógini er ásett, at kommunurnar hava eftirlit við bústøðum, tænastum og tilboðum, sambært Eldralógini, og at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um eftirlit. Vegna manglandi reglur frá landsstýrismanninum í almannamálum, er tó einki eftirlit skipað hjá kommununum. Hetta havi eg áður víst á í hjálagda skrivi til Almannamálaráðið, dagfest 24. apríl 2023.

Vísandi til omanfyristandandi um inntriv, sambært Tvingsilslógini, haldi eg tað vera sera ørkymlandi, at tað í løtuni hvørki er fyriskipað nakað eftirlit á eldraøkinum ella sambært Tvingsilslógini, sum hevur eftirlit við støðuni á eldraøkinum m.a. í mun til inntriv, sambært Tvingsilslógini.

Eg fari tí at heita á landsstýriskvinnuna í almannamálum um at skipa reglur um eftirlit á eldraøkinum.

Eg fari samstundis at heita á landsstýrismannin í lógarmálum um at meta um tørvin á eftirliti í mun til inntriv, sambært Tvingsilslógini, og at umhugsa, hvørt tørvur er á eini eftirmeting av Tvingsilslógini. Vísast kann í hesum sambandi á kunngerð nr. 226 frá 2020 um námsfrøðiligt eftirlit, sum er galdandi fyri tænastur sambært lógini um almannatrygd og sum í mun til almannaøkið hevur áseting um eftirlit við inntrivum sambært tvingsilslógini."

*Uppfylging*
*Tann 12. desember 2024 kunnaði Almanna- og mentamálaráðið umboðsmannin um, at ráðið var farið undir at seta ein arbeiðsbólk, sum skal koma við einum tilmæli um, hvussu eftirlitið á eldraøkinum kann skipast. Arbeiðsbólkurin skal handa landsstýriskvinnuni í almanna- og mentamálum eitt tilmæli í juni 2025.*


JARÐFEINGI
P
30 min
9 - 18
(10 - 14)

# 6 Avvístar klagur

Orsøkin til, at umboðsmaðurin ikki viðger eina klagu, kann vera av formligum slag, so sum at klagan kemur ov seint, ella at ovasti myndugleiki á økinum ikki hevur tikið endaliga avgerð í málinum. Flestu klagur verða tó avvístar ella ikki viðgjørdar, tí umboðsmaðurin ikki metir seg hava nakað grundarlag fyri at gera meira við klaguna.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur valt at avvísa av ymiskum orsøkum.

**Umboðsmaðurin kann einans viðgera mál, sum eru viðgjørd av myndugleikum ella stovnum, sum hoyra til almennu fyrisitingina undir heimastýrinum (Umboðsmanslógin § 4, stk. 1)**

## MÁL NR. 24/01655 og 24/04774

Ein borgari klagaði um ymisk viðurskifti hjá Blákrossheiminum og Heilbrigdi. Umboðsmaðurin avvísti hesar klagur vísandi til, at Blákrossheimið og Heilbrigdi ikki vóru roknaðir sum partar av almennu fyrisitingini. Hóast ásett er í løgtingslógini um virksemi á stovnum, sum veita rúsviðgerð, at fyrisitingarlógin skal vera galdandi fyri viðgerðarstovnar, merkir hetta ikki neyðturviliga, at hesir stovnar verða roknaðir við til almennu fyrisitingina, sambært fyrisitingarlógini. Av tí at talan var um stovnar, sum hoyrdu til umsitingarøkið hjá Heilsumálaráðnum, spurdi umboðsmaðurin seg fyri hjá Heilsumálaráðnum, ið síðani umrøddi fyrispurningin við Løgmálaráðið, sum umsat fyrisitingarlógina. Heilsumálaráðið boðaði síðani umboðsmanninum frá, at hóast rúsviðgerðirnar hjá Blákrossheiminum vóru undir almennari stýring og eftirliti, og avgerðarvirksemið í sambandi við rúsviðgerðina var fevnt av fyrisitingarlógini, so mettu Heilsumálaráðið og Løgmálaráðið ikki, at Blákrossheimið og Heilbrigdi kundu roknast upp í almennu fyrisitingina. Umboðsmaðurin var samdur í hesi meting og avvísti tí klagurnar um Blákrossheimið og Heilbrigdi.

## MÁL NR. NR 24/02105

Ein borgari sendi klagu um ta viðgerð, felagið hjá borgaranum hevði fingið frá millum øðrum Landsgrannskoðanini. Umboðsmaðurin viðmerkti, at Landsgrannskoðanin var stovnur undir Løgtinginum, var óheft í virki sínum og var ikki at rokna sum ein partur av útinnandi valdinum. Umboðsmaðurin kundi tí ikki viðgera klagur um Landsgrannskoðanina.

**MÁL NR. 24/08377**

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um gegni hjá Formansskapinum í Føroya Løgtingi í sambandi við eitt ávíst mál. Formansskapurin í Føroya Løgtingi er ikki at rokna sum ein partur av útinnandi valdinum, og umboðsmaðurin kundi tí ikki viðgera klaguna.

## Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað. Klagarin skal navngeva seg (Umboðsmanslógin § 6, stk. 2)

**MÁL NR. 24/10030**

Ein borgari klagaði um ymisk viðurskifti hjá Búnaðarstovuni í sambandi við eina leigutrøð. Klaga um somu viðurskifti var áður send umboðsmanninum, og var klagan tá avvíst vegna 1 ára klagufreistina. Umboðsmaðurin avvísti tí eisini hesa klagu.

**MÁL NR. 24/19518**

Borgari klagaði um noktandi avgerð frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum upp á umsókn um kvotu til vinnuliga royndir og verkætlanir sambært Sjófeingislógini. Eisini varð klagað um, at borgarin ikki fekk fult innlit í síni viðurskifti, tá hann søkti Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið um innlit. Í klaguni varð m.a. víst á, at virkið, sum hevði fingið játtan frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, ikki var farið í gongd við sítt virksemi, og at partur av nevndu kvotu tí ikki var nýttur.

Sambært skjølunum var avgerðin hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum frá 2021, og avgerð var tikin um at nokta uppafturtøku av málinum í 2022. Í báðum førum var sostatt talan um avgerðir, sum vóru meira enn eitt ár framman undan klaguni til umboðsmannin, og av hesi grund kundi umboðsmaðurin ikki viðgera klagu um sjálvar avgerðirnar frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum. Harnæst var hendan útlutanin hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum av kvotum í 2021 fevnd av kanningini, sum kanningarstjóri gjørdi í mai 2023, sambært stýrisskipanarlógini § 38, stk. 2.

Avgerðin frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum um innlit var frá 2022. Klagan um hesa avgerð fall tí eisini fyri eitt ára freistini.

Klagarin vísti á, at umboðsmaðurin kundi síggja burtur frá eitt ára freistini og nýta sína heimild at taka málið til viðgerð av egnum ávum. Umboðsmaðurin viðmerkti hesum viðvíkjandi, at spurningurin um vantandi nýtslu av kvotuni vóru viðurskifti millum virkið og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, og at ongar reglur eru í Sjófeingislógini ella tilhoyrandi kunngerðini um, at virki klagarans hevur rætt til ikki nýttu kvotuna.

**Hægsti myndugleiki á økinum skal hava tikið avgerð í málinum, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu um eitt mál (Umboðsmanslógin § 6, stk. 3)**

### MÁL NR. 23/24944

Ein borgari klagaði um noktandi svar frá Tórshavnar kommunu um at flyta ruskílatið. Klagan varð send kommununi til ummælis, eins og umboðsmaðurin eisini spurdi kommununa um kæruvegleiðing til klagaran. Undir viðgerðini hjá umboðsmanninum gav kommunan klagaranum síðani eina avgerð við upplýsing um fyrisitingarligan kærumøguleika.
Umboðsmaðurin avvísti síðani klaguna grundað á, at kærumøguleikin mátti troytast.

### MÁL NR. 24/09012

Tann 3. apríl 2024 klagaði ein borgari um vantandi svar frá Almannaverkinum upp á umsókn um økta stuðulstænastu.

Tann 24. apríl 2024 fekk umboðsmaðurin frágreiðing frá Almannaverkinum og avrit av avgerð, sum Almannaverkið hevði sent borgaranum, tann 18. apríl 2024, um ikki at játta økta stuðulstænastu. Í avgerðini varð víst til umsókn frá 13. mars 2024 um fleiri stuðulstímar. Í avgerðini hevði Almannaverkið givið kæruvegleiðing og upplýsing um, at kærufreistin var 4 vikur.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at tá talan var um umsókn frá 13. mars 2024, og Almannaverkið hevði fráboðað avgerð upp á umsóknina, tann 18. apríl 2024, var málsviðgerðartíðin somikið stutt, at grundarlag var ikki fyri at halda, at talan var um ov langa viðgerðartíð.
Umboðsmaðurin vísti eisini á, at sambært § 6, stk. 3 kunnu klagur um avgerðir, ið ein møguligur hægri fyrisitingarmyndugleiki kann broyta, ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Í ítøkiliga málinum merkti hetta, at umboðsmaðurin ikki kundi viðgera eina klagu um avgerðina, sum borgarin hevði fingið frá Almannaverkinum, fyrr enn hon var kærd til Kærustovnin, og Kærustovnurin hevði tikið endaliga avgerð í málinum.

### MÁL NR. 24/15045

Ein borgari klagaði um avgerð hjá Fuglafjarðar kommunu um treytað byggiloyvi til at byggja fleiri goymslutunlar. Borgarin hevði eisini sent kæru til Føroya Kærustovn um avgerðina, og kæran var undir viðgerð hjá Kærustovninum. Av tí, at málið enn var undir fyrisitingarligari viðgerð, avvísti umboðsmaðurin hesa klaguna.

## MÁL NR. 24/20784

Ein borgari var ónøgdur við avgerð hjá Heilsu- og umsorganartænastuni hjá Tórshavnar kommunu um at sýta borgaranum ansingarsamsýning fyri at ansa foreldrum sínum heima og endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku fyri ávíst tíðarskeið. Borgarin hevði kært avgerðina til Føroya Kærustovn, sum hevði víst málinum aftur til Tórshavnar kommunu til nýggja viðgerð. Málið kundi tí ikki leggjast fyri umboðsmannin, fyrrenn Tórshavnar kommuna hevði viðgjørt málið av nýggjum. Umboðsmaðurin avvísti tí málið.

### Grundarlag er ikki fyri at gera meira við klaguna (Umboðsmanslógin § 6, stk. 4)

## MÁL NR. 24/04896

Ein borgari var ónøgdur við viðgerðartíðina hjá Klaksvíkar kommunu av byggisamtykt fyri Svínoynna. Uppskot til almenna byggisamtykt fyri Svínoy var lýst og lagt fram til alment eftirlit í 2022, men enn var eingin byggisamtykt lýst fyri Svínoy.

Umboðsmaðurin vísti á, at kommunustýrið, sambært § 4, stk. 3 í býarskipanarlógini, hevði skyldu at gera eina byggisamtykt, sum skuldi góðkennast av landsstýriskvinnuni í umhvørvismálum. Fyrisitingarliga viðgerðin av byggisamtyktum fer fram eftir serligu reglunum í býarskipanarlógini og var ikki endaliga avgreidd í hesum máli. Umboðsmaðurin helt tí ikki, at málið í løtuni hóskaði seg til eina viðgerð hjá umboðsmanninum.

Umboðsmaðurin mælti borgaranum til at venda sær aftur til Klaksvíkar kommunu fyri nærri kunning um, hvussu leið við arbeiðinum við byggisamtyktini fyri Svínoy. Um arbeiðið hjá Klaksvíkar kommunu við byggisamtykt fyri Svínoy dró út, kundi borgarin eisini umhugsa at venda sær til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum, sum varaði av býarskipanarlógini.

## MÁL NR. 24/06657

Ein borgari klagaði um viðgerðina hjá Landsverk av einum máli, sum snúði seg um eitt illa farið vegastrekki. Bilurin hjá borgaranum hevði fingið dekk- og felguskaða við at renna í eina djúpa holu í landsvegnum við Vatnsoyrar. Umboðsmaðurin viðmerkti, at hann hevði eftirlit við fyrisitingarligum virksemi hjá myndugleikum, meðan klagan í høvuðsheitum snúði seg um endurgjald, sum mátti metast at vera privatrættarligt virksemi. Umboðsmaðurin gjørdi tí ikki meira við málið. Um borgarin ynskti at royna tann partin av avgerðini hjá Landsverk, sum snúði seg um skeltingina á skaðastaðnum, vísti umboðsmaðurin borgaranum til at venda sær til landsstýrismannin í fiskivinnu- og samferðslumálum, sum umsat ferðslulógina og hevði yvirskipaða eftirlitið við Landsverk.

### MÁL NR. 24/08794

Fugloyar Kommuna klagaði um málsviðgerðartíð, vantandi svar og ósakliga viðgerð hjá Umhvørvisstovuni av eini umsókn um at fáa ein uppdyrkingarveg lagdan inn aftur til eitt festi. Umboðsmaðurin viðmerkti, at hon sambært § 5 í umboðsmanslógini hevði eftirlit við, at almennir myndugleikar ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum. Í hesum máli var ikki talan um klagu frá borgara, harumframt var tað ikki kommunan, men festarin og Búnaðarstovan, sum sambært skjølunum vóru umsøkjarar í málinum. Umboðsmaðurin gjørdi tí ikki meira við málið, men mælti kommununi til at venda sær til avvarðandi myndugleikar fyri at hoyra, hvat málið bíðaði eftir.

### MÁL NR. 24/17539

Ein advokatur klagaði vegna Fuglafjarðar kommunu um málsviðgerð og vantandi svar frá Kappingareftirlitinum í sambandi við eitt mál, sum í áravís hevði koyrt hjá kappingarmyndugleikunum. Umboðsmaðurin viðmerkti, at umboðsmaðurin vanliga ikki viðgjørdi klagur millum almennar myndugleikar, men hevði eftirlit við, at almenna umsitingin ikki framdi órætt móti einstaka borgaranum. Umboðsmaðurin gjørdi tí ikki meira við málið, men mælti klagaranum at venda sær til stjóran á Vinnustovninum ella til Uttanríkis- og vinnumálaráðið, sum varaði av Vinnustovninum, fyri at fáa svar til sínar fyrispurningar.



# 7 Onnur viðgerð og hjálp til borgarar

Umboðsmaðurin hevur ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Ein klaga verður altíð kannað gjølla, áðrenn avgerð verður tikin, um hon skal avvísast. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ein avvísing av einari klagu kann vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Niðanfyri eru dømir um mál, har grundarlag ikki var fyri at gera meira við klaguna, tí gongd var komin á málið, málið var loyst undir klaguviðgerðini, ella borgarin fekk hjálp á annan hátt.**

## MÁL NR 24/06621 og framhald 24/17715

Ein borgari klagaði um málsviðgerðina hjá Klaksvíkar kommunu í sambandi við, at nakrar reklamu-flaggstengur, ið stóðu uppi, vóru í stríð við byggisamtyktina hjá Klaksvíkar kommunu.

Umboðsmaðurin vendi sær til Klaksvíkar kommunu, ið upplýsti, at heitt var á eigaran um at taka flaggstengurnar niður, og at mannagongdirnar hjá kommununi viðvíkjandi ólógligari bygging fóru at verða fylgdar í hesum máli.
Grundað á, at gongd var í málinum, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

Fýra mánaðir seinni klagaði sami borgari aftur til umboðsmannin í sambandi við, at Klaksvíkar kommunu hevði slept málinum, tí flaggstengurnar bert vóru nýttar til Merkið.

Umboðsmaðurin spurdi seg fyri hjá Umhvørvismálaráðnum, ið varir av byggilógini og kunngerð nr. 72 frá 27. juni 2016 um bygningskunngerð 2017 (BK17). Ráðið greiddi frá, at hvørki reklamuflaggstengur ella vanligar flaggstengur eru fevndar av byggilógini ella av BK17. Sambært hesum kravdist ikki byggiloyvi til tær ávísu flaggstengurnar, uttan mun til um tær vóru nýttar til reklamur ella Merkið. Umboðsmaðurin metti ikki grundarlag vera fyri at gera meira við málið.

## MÁL NR 24/07281

Ein borgari klagaði um vantandi svar frá Tórshavnar kommunu í sambandi við vetrarfriðing í Nólsoy. Umboðsmaðurin sendi kommununi klaguna til ummælis. Undir viðgerðini upplýsti kommunan, at ein loysn nú var funnin á trupulleikanum, og borgarin nú eisini hevði fingið svar upp á sínar spurningar.
Umboðsmaðurin metti tí, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við málið.

## MÁL NR 24/27240

Borgari klagaði til umboðsmanninum um, at Almannaverkið ikki svaraði hansara fyrispurningum um ivamál í sambandi við útgjald av fyritíðarpensjón, herundir m.a. hví veitingin var vorðin umleið 3.000 kr. minni.

Í frágreiðing um málið greiddi Almannaverkið m.a. frá, at klagarin áður hevði fingið tillutað miðal fyritíðarpensjón. Í summar varð avgerð tikin um at flyta klagaran upp á hægstu fyritíðarpensjón. Upphæddin fyri miðal fyritíðarpensjón varð flutt klagaranum fyri mánaðin, tá avgerðin varð tikin um at tilluta honum hægstu fyritíðarpensjón. Tískil varð henda upphædd, ið er munurin á miðal og hægstu fyritíðarpensjón, løgd aftrat pensjónini mánaðin eftir. Talan var um umleið 3.125 kr. Almannaverkið hevði sostatt ikki lækkað pensjónina við 3 til 4000 kr. um mánaðin, sum klagarin helt, men talan var um eina upphædd, ið bert skuldi flytast klagaranum einaferð.
Viðv. tí partinum av klaguni, sum snúði seg um, at Almannaverkið ikki svaraði fyrispurningum frá klagaranum, viðmerkti Almannaverkið, at klagarin tann 1. oktober 2024 og 8. november 2024 skrivaði teldupostar um, at klagarin ynskti fund. Hesir teldupostar vóru dotnir niður ímillum, og klagarin fekk ikki svar frá Almannaverkinum innan rímiliga tíð. Ein av orsøkunum var, at tá viðgerðin av fyritíðarpensjónini var avgreidd, og klagarin var fluttur upp á hægstu fyritíðarpensjón, varð málið flutt til aðra deild, ið síðan tók sær av øðrum viðurskiftum klagarans. Almannaverkið harmaðist um, at teldupostarnir ikki vóru viðgjørdir, so klagarin fekk nøktandi svar innan rímiliga tíð. Almannaverkið viðmerkti, at samskiftið millum klagaran og Almannaverkið var aftur komið í rætta legu, og klagarin hevði nú verið á fundi við ráðgeva hjá Almannaverkinum, og nýggjur fundur var eisini avtalaður.

Eftir at hava fingið frágreiðing frá Almannaverkinum um málið, helt umboðsmaðurin, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna, tí greiða var nú fingin á, hví útgjaldið frá Almannaverkinum ikki hevði verið tað sama hvønn mánað, síðani klagarin fekk játtað hægstu fyritíðarpensjón, og tí samskiftið við Almannaverkið var komið í rættlag.

**Frágreiðing frá myndugleikanum um málið gjørdi, at umboðsmaðurin metti, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við málið.**

## MÁL NR 24/03710 og 24/03711

Tann 14. februar 2024 sendi Yrkisfelagið Miðnám umboðsmanninum klagu um langa viðgerðartíð hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum í sambandi við kæru, send 6. juli 2023, um bygnaðarbroytingar á Glasi.
Umboðsmaðurin spurdi Fíggjarmálaráðið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið um orsøkina til, at kæran frá Yrkisfelagnum Miðnám ikki var svarað, og nær felagið kundi vænta at fáa svar.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið sendi umboðsmanninum frágreiðing, dagfest 5. apríl

2024, har greitt varð frá orsøkini til, at málið hevði drigið út, og at ráðið væntaði at svara kæruni frá felagnum í apríl mánaði.
Fíggjarmálaráðið greiddi frá, at millum Fíggjarmálaráðið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið var avtalað, at Barna- og útbúgvingarmálaráðið skuldi viðgera sjálvt kærumálið, meðan Fíggjarmálaráðið skuldi svara spurningunum, sum liggja undir málsøkinum hjá Fíggjarmálaráðnum/lønardeildini, so sum fyrispurningum um flokking av størvum og sáttmálaviðurskiftum. Sum skilst, sendi Fíggjarmálaráðið, tann 13. juli 2023, skriv til Barna– og útbúgvingarmálaráðið um sín part av málinum. Umboðsmaðurin spurdi Fíggjarmálaráðið, um ráðið hevði kunnað felagið um hendan arbeiðsleist, og um skrivið til Barna- og útbúgvingarmálaráðið, tann 13. juli 2023. Fíggjarmálaráðið svaraði, at ráðið metti seg sum hoyringspart í hesum máli, og tí varð svar teirra sent Barna- og útbúgvingarmálaráðnum uttan at kunna Yrkisfelagið Miðnám.

Eftir at hava kannað málið, var støðan í málinum samanumtikið, at kærumálið enn var undir viðgerð í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, meðan Fíggjarmálaráðið metti seg hava svarað sínum parti av kæruni. Sambært Barna- og útbúgvingarmálaráðnum kundi svar upp á kæruna væntast í apríl mánaði.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at hann helt, at viðgerðartíðin í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum var vorðin í so drúgv. Men við tað, at talan var um torgreitt mál, at langa viðgerðartíðin m.a. var tengd at sjúkrafráveru í starvsfólkahópinum hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, og at eitt svar var væntandi í næstum, helt umboðsmaðurin, at í løtuni var ikki grundarlag fyri at gera meira við málið.
Umboðsmaðurin viðmerkti eisini, at tá kæran eisini var send Fíggjarmálaráðnum, átti Fíggjarmálaráðið, sambært góðum fyrisitingarsiði, at havt kunnað felagið um avtalaða arbeiðsleistin millum ráðini.

## MÁL NR 24/06668

Umboðsmaðurin fekk eina klagu um, at Almanna- og mentamálaráðið hevði noktað at givið innlit í skjøl um setan av nýggjum prósti. Umboðsmaðurin sendi ráðnum klaguna til viðmerkingar og bað um at síggja skjølini.

Við gjøgnumgongd av skjølunum sást, at noktandi innlitið viðvíkti trimum ymiskum málum:

- Próstur – setan
- Kæra um innlit og brot á setanarpolitik landsins
  (mín viðm. kæra um setanartilgongdina v.m.)
- Kæra viðv. lýsing og setan av prósti (mín viðm. kærumál um partsinnlit)

Umboðsmaðurin bað Almanna- og mentamálaráðið um grundgeving fyri, hví kærumálini vórðu viðgjørd eftir innlitsreglunum fyri setanarmál, sambært § 2, stk. 1 í innlitslógini.
Almanna- og mentamálaráðið greiddi frá, at avgerðin um setan av einum prósti er fevnd av hugtakinum setanarmál, sambært § 2, stk. 1 í innlitslógini. Sama er galdandi fyri kærur ella klagur sum liður í setanarmálinum. Tað, at eitt mál verður kært, ger ikki, at málið broytir støðu frá at vera eitt setanarmál til at verða mál fevnt av innlitslógini.

Umboðsmaðurin var samdur við ráðnum í, at málini "Próstur – setan" og "Kæra um innlit og brot á setanarpolitik landsins" samanumtikið kundu eyðmerkjast sum setanarmál, og at kæran av setanarmálinum ikki gjørdi, at tað broytti støðu. Hesi mál vóru tí í síni heild undantikin frá innliti eftir innlitslógini.

Viðvíkjandi kærumálinum um partsinnlit, metti umboðsmaðurin støðuna nakað annarleiðis. Málið um partsinnlit hevði frá sínum uppruna í Føroya Stiftsstjórn verið eitt mál um partsinnlit, sum var viðgjørt eftir reglunum í §§ 9 og § 10, stk. 2 í fyrisitingarlógini. Tað var harvið ikki eitt mál, sum kundi eyðmerkjast sum setanarmál, sambært § 2, stk. 1 í innlitslógini. Tá fjølmiðil søkir innlit í eitt slíkt mál, eigur tað at verða viðgjørt eftir vanligu reglunum um innlit í innlitslógini. At avgerðin um partsinnlit bleiv kærd til ráðið broytti ikki hesa støðu, heldur ikki um kæran innleiðandi var samantvinnað kæruni um setanartilgongdina v.m.

Sambært § 12, stk. 1 í innlitslógini fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um upplýsingar um privatu viðurskiftini hjá einstaklingum, og sambært § 13, stk. 1 nr. 6 í innlitslógini kann rætturin til skjalainnlit avmarkast í tann mun, tað er neyðugt, til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi m.a. privatum áhugamálum.

Umboðsmaðurin metti, at tað hevði verið rættast, at Almanna- og mentamálaráðið í fyrsta lagi viðgjørdi innlitsumbønina frá Kringvarpinum um innlit í kærumálið um partsinnlit eftir vanligu reglunum um innlit í innlitslógini, herundir § 12, stk. 1 nr. 1) og § 13, stk. 1 nr. 6) í lógini um alment innlit.

Við tað, at væntast kundi, at ein viðgerð eftir nevndu reglum stórt sæð hevði ført til, at innlit varð noktað í so gott sum øll skjøl/upplýsingar í kærumálinum um partsinnlit, helt umboðsmaðurin ikki grundarlag vera fyri at seta nærri kanning í gongd av málinum.

Av málinum sást, at Almanna- og mentamálaráðið hevði valt at lata meirinnlit í avgerðina hjá ráðnum í navnleysum líki vísandi til, at málið hevði stóran samfelagsligan áhuga. Hetta hevði umboðsmaðurin onga viðmerking til. Umboðsmaðurin gjørdi ikki meira við klaguna.

## MÁL NR 24/10326

Ein borgari klagaði um viðgerðina og avgerðina hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum í sambandi við eitt kærumál um innskriving í 1. flokk. Talan var um eitt barn, ið var fimm ár, ið søkt var um at fáa innskrivað. Klagarin vildi eisini vera við, at talan var um ógegni í sambandi við kærumálsviðgerðina hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, tí at ráðið frammanundan hevði veitt ráðgeving til Undirvísingarstýrið í sambandi við teirra avgerð, ið eftirfylgjandi varð kærd til Barna- og útbúgvingarmálaráðið.

Umboðsmaðurin bað Barna- og útbúgvingarmálaráðið um at geva sær eina frágreiðing um viðgerðina av málinum, umframt øll skjøl viðvíkjandi málinum.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið vísti í frágreiðing sínari á, at ráðið metti, at heimild ikki var

fyri at ganga umsókn klagarans á møti, vísandi til § 42, stk. 1, 2 og 5 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan.
Eftir at hava lisið klaguna, frágreiðingina frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum og skjølini boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at umboðsmaðurin ikki helt, at grundarlag var fyri at gera meira við klaguna. Hesa fatan bygdi umboðsmaðurin á, at hann, eftir at hava lisið § 42 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan og viðmerkingarnar til hana, ikki fann orsøk at finnast at tulkingini av ásetingini í kæruavgerðini hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

Í mun til spurningin um ógegni metti umboðsmaðurin, at talan í hesum føri var um, at ein yvirskipaður myndugleiki veitti vegleiðing um lógartulking til ein undirskipaðan myndugleika. Soleiðis sum málið var lýst, metti umboðsmaðurin, at talan ikki var um ógegni sambært § 3, stk. 1, nr. 4 í fyrisitingarlógini.

## MÁL NR 24/10344

Tann 19. apríl 2024 sendi Kringvarp Føroya klagu til umboðsmannin um avgerð hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum frá 18. apríl 2024, har ráðið noktaði Kringvarpinum innlit í løgfrøðiligu grundgevingina/metingina hjá ráðnum í sambandi við broyting í kunngerðini um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti í 2024.
Tann 29. apríl 2024 sendi ráðið umboðsmanninum frágreiðing og viðkomandi skjøl – eitt innanhýsis upprit við fylgiskjali 1 og eitt arbeiðsskjal.
Tann 29. apríl 2024 sendi umboðsmaðurin Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum nakrar avklárandi spurningar um móttiknu skjølini, so greiða fekst á, hvør hevði skrivað skjølini, hvør hevði havt skjølini til viðmerkingar, og nær skjølini vóru endalig.
Tann 2. mai 2024 upplýsti Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, at arbeiðsskjalið við fylgiskjali 1 varð stovnað 25. mars 2024, og eftir at hava verið til viðmerkingar í ráðnum bleiv hetta til innanhýsis uppritið, sum varð endaligt tann 29. apríl 2024.
Sambært málsskjølunum, sendi Kringvarpið innlitsumbønina tann 11. apríl 2024, og tann 18. apríl 2024 fráboðaði Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið noktandi avgerðina.

Í noktandi avgerðini vísti Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið til, at talan var um innanhýsis arbeiðsskjøl, sum sambært § 7 í innlitslógini vóru undantikin innliti, sum ikki komu undir innlit eftir reglunum í § 8, og sum eftir teirra metan heldur ikki innihildu upplýsingar um veruligar umstøður, sum skuldu ekstraherast, sambært reglunum í § 11 stk. 1 v.m. Ráðið metti eisini, at grundarlag var ikki fyri at veita meirinnlit.

Eftir at umboðsmaðurin hevði lisið skjølini í málinum, og Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevði upplýst, at tey viðkomandi skjølini ikki vórðu liðugt tilevnað, tá Kringvarpið søkti innlit, og at skjølini heldur ikki vóru liðug, tá avgerðin varð tikin 18. apríl 2024, metti umboðsmaðurin, at Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið av røttum kundi nokta Kringvarpinum innlit við tí grundgeving, at innanhýsis skjølini, sum innlit var søkt í, vóru ikki liðug sambært § 4, stk.1 og § 8, stk. 1 í innlitslógini.

Tá talan var um skjøl, sum ikki vóru liðug, tá søkt var um innlit, er tað sambært § 4, stk. 1 jvb. § 8, stk.1 ikki innlit í skjølini.
Umboðsmaðurin boðaði tí Kringvarpinum frá, at hann helt, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at um hetta elvdi til, at Kringvarpið av nýggjum søkti innlit í nevndu skjøl, nú tey vóru liðugt tilevnað, vildi hann yvirfyri Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum viðmerkja, at í eini nýggjari innlitsviðgerð átti dentur at verða lagdur á skylduna at ekstrahera úr skjølunum, samsvarandi reglunum í § 11, stk. 1 í innlitslógini. Víst var í hesum sambandi til LUM málini nr. 21/21425 og 22/00137 og á greinina á heimasíðu okkara: "Ekstrahering – úrdrag av upplýsingum um veruligar umstøður".

## MÁL NR 24/14889

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um tilgongdina og avgerðina hjá Tórshavnar kommunu í einum setanarmáli.
Umboðsmaðurin bað Tórshavnar kommunu um at geva sær eina frágreiðing um viðgerðina av málinum og um at lata sær avrit av starvslýsingini í málinum.
Umboðsmaðurin vísti á, at setanarrættarligt hevur ein almennur arbeiðsgevari m.a. skyldu at lýsa eitt setanarmál til fulnar og í sambandi við setan eina skyldu at seta best skikkaða umsøkjaran í starv.
Eftir at hava lisið frágreiðingina frá Tórshavnar kommunu umframt onnur skjøl, ið kommunan hevði latið umboðsmanninum, boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at hann ikki hevði funnið orsøk at finnast at setanartilgongdini ella grundgevingini fyri avgerðini hjá Tórshavnar kommunu um ikki at seta klagaran í starv.

## MÁL NR 24/18776

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um svarið, hann hevði fingið frá Løgmansskrivstovuni, í sambandi við umbøn sína um innlit í skjøl viðvíkjandi infrastrukturinum millum Streymoynna og oyggjarnar sunnanfyri við serligum atliti at umleggingini til eitt komandi vegasamband.
Løgmansskrivstovan hevði skilt umbønina soleiðis, at skjølini, ið umbønin snúði seg um, vóru partur av fyrireiking til lóggávu, ið sambært § 2, stk. 2 í innlitslógini ikki vóru fevnd av rættinum til innlit. Klagarin vildi vera við, at talan eisini var um annað tilfar enn hetta, ið umbønin um innlit fevndi um.
Umboðsmaðurin sendi Løgmansskrivstovuni klaguna til ummælis.
Løgmansskrivstovan greiddi m.a. frá, at talan í høvuðsheitum var um upplýsingar, ið vóru partur av fyrireikingini til lóggávu, ið Løgmansskrivstovan áður hevði víst á, men at Løgmansskrivstovan fór at taka viðgerðina av umbønini um innlit uppaftur til nýggja viðgerð.
Vísandi til, at talan var um eitt rúgvismikið mál, og at umbønin um innlit var tikin uppaftur til viðgerðar, helt umboðsmaðurin ikki grundarlag vera fyri at gera meira við klaguna.

## MÁL NR 24/19455

Ein borgari klagaði í august til umboðsmanninum um, at Heilsutrygd hevði nýtt ov langa málsviðgerðartíð at endurrinda heilsutrygdargjøld.
Umboðsmaðurin bað Heilsutrygd um at geva sær eina frágreiðing um viðgerðina av málinum. Heilsutrygd greiddi m.a. umboðsmanninum frá, at arbeitt varð við málinum, og at ætlanin var at leggja eitt lógaruppskot fyri Løgtingið í tingsetuni 2024-25. Heilsutrygd greiddi eisini frá, at um og tá Heilsutrygd ella TAKS fingu heimild at viðgera gomul heilsutrygdargjøld, væntaði stovnurin, at borgarar kundu gera vart við seg og fáa TAKS/Heilsutrygd at viðgera málini.
Eftir at hava lisið klaguna og frágreiðingina frá Heilsutrygd, boðaði umboðsmaðurin í oktober klagaranum frá, at grundarlag ikki var fyri at gera meira við klaguna við tað, at gongd var í málinum.
Umboðsmaðurin gav sær eisini far um, at landsstýriskvinnan í heilsumálum hevði kunnað um, at farið var í gongd við at gera eitt lógaruppskot um at rinda heilsutrygdargjald aftur í tíð til persónar, ið av órøttum høvdu goldið ov nógv í heilsutrygdargjaldi.



„Um myndugleikin í síni málsupplýsing ikki lýsir barnsins besta og barnsins sjónarmið á nøktandi hátt, kann málsviðgerðin eftir míni meting ikki sigast at vera í samsvar við ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum. Harumframt er vandi fyri, at avgerðirnar verða skeivar løgfrøðiliga, eins og tær ikki verða tær best møguligu í mun til barnið.“



**Hanna Vang**, Løgtingsins og barnanna umboðsmaður, juli 2024

# Barnarættindasáttmálin og málsupplýsingarskyldan

## Orsøkin til greinina

Sáttmálin um rættindi hjá børnum (Barnarættindasáttmálin) var samtyktur av ST aðalfundinum 20. november í 1989 og hevur verið í gildi fyri Føroyar síðani 1993, tá landafrøðiliga fyrivarnið hjá Danmark var tikið.

Tann 1. oktober 2014 varð virksemið hjá Løgtingsins umboðsmanni víðkað til eisini at fevna um eitt serligt eftirlit á barna- og ungdómsøkinum. Umboðsmaðurin viðger klagur um viðurskifti hjá børnum, tekur mál upp av egnum ávum viðvíkjandi børnum og kann fara á eftirlitsvitjanir á almennum og privatum stovnum v.m., har børn eru. Umboðsmaðurin skal eisini hava eitt serligt eftirlit við, at Barnarættindasáttmálin hjá ST verður hildin, og gera Løgtingið og Landsstýrið varug við, um lógir og fyrisitingarligar ásetingar ikki eru sambæriligar við Barnarættindasáttmálan.

Í eina tíð hevur umboðsmaðurin í sambandi við mál á barnaøkinum haft sjóneykuna á upplýsingarskylduna hjá myndugleikum, og hvussu skjalfesting og journalisering fer fram. Umboðsmaðurin hevur eitt nú í onkrum málum sett myndugleikum spurningar, um nær samrøða hevur verið við barnið, hvussu barnsins sjónarmið eru lýst og biðið um skjalprógv úr málinum viðvíkjandi hesum viðurskiftum.

Endamálið við hesi grein er at lýsa, hvørji krøv umboðsmaðurin metir, at Barnarættindasáttmálin setur til málsviðgerðina hjá myndugleikum. Við støði í høvuðsreglunum í Barnarættindasáttmálanum um barnsins besta (grein 3) og barnsins

sjónarmið (grein 12) lýsir greinin upplýsingarskylduna, notatskylduna og skylduna at journalisera.
Høvuðsreglurnar í Barnarættindasáttmálanum um barnsins besta (grein 3) og barnsins sjónarmið (grein 12) eru galdandi bæði fyri børn, sum einstaklingar og sum bólk, men henda greinin viðgerð einans børn sum einstaklingar.

## Upplýsingarskyldan hjá myndugleikum (da. Officialprincippet)

Galdandi fyri allar almennar myndugleikar er ein upplýsingarskylda. Upplýsingarskyldan inniber, at myndugleikar skulu lýsa mál væl, áðrenn støða verður tikin til málið. Henda upplýsing av málinum umfatar bæði løgfrøðiliga grundarlagið og tær veruligu umstøðurnar í málinum. Um ein myndugleiki ikki lýsir mál síni nóg gjølla, er vandi fyri at avgerðir myndugleikans verða skeivar. Endamálið við upplýsingarskylduni er at lýsa mál so mikið væl, at myndugleikin gerst førur fyri at taka løgfrøðiliga rættar, men eisini skynsamar, avgerðir.
Um upplýsingarskyldan ikki verður hildin, kann koma fyri, at eitt mál er so illa lýst, at kærumyndugleikin metir eina avgerð ógyldiga ella vísir málið aftur til nýggja viðgerð.
Sí nærri um upplýsingarskylduna í greinini í savninum á heimasíðuni "At halda seg kenna" Grein: At halda seg kenna (upplýsingarskyldan) (lum.fo)

## Føroyar hava bundið seg at halda Barnarættindasáttmálan

Barnarættindasáttmálin hevur verið í gildi fyri Føroyar síðani 1993, tá landafrøðiliga fyrivarnið hjá Danmark var tikið aftur. Føroyar hava sostatt bundið seg yvir fyri Sameindu Tjóðum at halda ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum.
Barnarættindasáttmálin hevur 54 lógargreinar. Av hesum snúgva 41 lógargreinar seg um týdningarmikil rættindi, sum børn hava.
Tvær av høvuðsreglunum í Barnarættindasáttmálanum eru
Grein 3: at vaksin skulu gera tað, sum er best fyri børn (hereftir nevnt barnsins besta)
Grein 12: at børn hava rætt til at hava sína egnu meining, og hana skulu tey vaksnu virða (hereftir barnsins sjónarmið)

## Barnsins besta og upplýsingarskyldan

Í grein 3 í Barnarættindasáttmálanum finst høvuðsreglan um, at vaksin skulu gera tað sum er best fyri børn.
"Grein 3
1. Í øllum tiltøkum viðvíkjandi børnum, sama um tey verða framd av almennum ella privatum stovnum fyri samfelagsliga vælferð, dómstólum, fyrisitingarmyndugleikum ella lóggávustovnum, skal barnsins tørvur setast fremst.
2. Luttakaralondini átaka sær at tryggja barninum ta vernd og umsorgan, sum er neyðug fyri barnsins trivnað við fyriliti fyri teimum rættindum og skyldum, sum galda fyri foreldur ella verja barnsins ella onnur, ið hava løgfrøðiliga ábyrgd av barninum, og skulu við tí í huga seta í verk øll hóskandi lóggávulig og fyrisitingarlig tiltøk.

3. Luttakaralondini skulu tryggja, at stovnar og tænastur, ið hava ábyrgd av at hava umsorgan fyri ella skulu verja børnini, eru í samsvari við tey aðalkrøv, sum skikkaðir myndugleikar hava ásett, serstakliga við atliti at trygd, heilsu, starvsfólkatali og starvsfólkaførleika og harumframt serkønari umsjón."

Grein 3 hevur sum endamál at tryggja áhugamálini hjá børnum. Reglan inniber, at barnsins tørvur skal setast fremst í øllum tiltøkum viðvíkjandi børnum. Tá almennir myndugleikar taka avgerðir viðvíkjandi børnum ella avgerðir, sum koma at ávirka børn, eigur barnsins tørvur og umstøður at verða lýst á nøktandi hátt, áðrenn avgerð verður tikin.
Sambært Barnarættindasáttmálanum skal barnsins besta vera eitt grundleggjandi atlit í øllum málum, sum á ein ella annan hátt viðvíkja børnum ella ávirka børn.
Fyri at kunna taka atlit til barnsins besta í málsviðgerðini, er neyðugt, at myndugleikar í hvørjum einstøkum føri kanna og upplýsa málið við tí fyri at eyga at lýsa, hvat ítøkiliga málið inniber fyri barnið. Lýsingin eigur eftir míni meting at umfata, hvørjar avleiðingar ymisku møguligu avgerðirnar kunnast væntast at fáa fyri barnið, eins og hvussu umfatandi hesar ymsu avleiðingarnar kunnu væntast at verða.
Skyldan, sambært Barnarættindasáttmálanum, at lýsa, hvat er til barnsins besta má metast at vera rættiliga umfatandi og er viðkomandi, um tað í málinum finnast viðurskifti, sum viðvíkja einum barni ella hava ávirkan á eitt barn.
Um myndugleikin í síni málsupplýsing ikki lýsir barnsins besta og barnsins sjónarmið á nøktandi hátt, kann málsviðgerðin eftir míni meting ikki sigast at vera í samsvar við ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum. Harumframt er vandi fyri, at avgerðirnar verða skeivar løgfrøðiliga, eins og tær ikki verða tær best møguligu í mun til barnið.

## Barnsins sjónarmið og upplýsingarskyldan

Tá myndugleikin í málsupplýsingini í ítøkiligum máli fer undir at lýsa barnsins besta, er viðkomandi at hava grein 12 í Barnarættindasáttmálanum í huga.
"Grein 12
1. Luttakaralondini skulu tryggja einum barni, sum er ført fyri at orða síni egnu sjónarmið, rættin til frítt at greiða frá hesum sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið; dentur skal leggjast á barnsins sjónarmið í samsvari við aldurin á barninum og hvussu búgvið tað er.
2. Við atliti at hesum skal barnið serliga fáa høvi til at koma til orðanna í einari og hvørjari viðgerð av málum við dóms- ella fyrisitingarmyndugleika, sum viðvíkja barninum, annaðhvørt beinleiðis ella gjøgnum eitt umboð ella ein hóskandi stovn, og skal tað gerast í samsvari við mannagongdir, sum eru ásettar í tjóðarrætti. "
Grein 12 er høvuðsreglan um, at børn hava rætt til at hava sína egnu meining, og at tey vaksnu skulu virða hana. Við at samtykkja Barnarættindasáttmálan hava Føroyar átikið sær eina skyldu at viðurkenna rættin hjá børnum at orða síni sjónarmið í málum sum viðvíkja teimum ella sum ávirka tey.

Grein 12 inniber tí, at eitt barn, sum er ført fyri at orða síni egnu sjónarmið, hevur rætt til frítt at sleppa at greiða frá sínum sjónarmiðum í øllum viðurskiftum, sum hava samband við barnið.
Í sambandi við skylduna hjá myndugleikum at lata børn koma til orðanna í øllum málum sum viðvíkja ella ávirka tey, fari eg at endurgeva brot úr greinini "Hoyring av børnum" í savninum á heimasíðuni:
"Luttakaralondini skulu tryggja barninum rætt til frítt at orða síni egnu sjónarmið. Orðingin, "skulu tryggja", er ein løglig orðing við serligari styrki, ið ikki gevur luttakaralondunum rásarúm fyri nakrari meting. Luttakaralondini hava sostatt eina klára løgliga skyldu at viðurkenna hendan rættin hjá barninum og at tryggja øllum børnum henda rætt."
Viðvíkjandi aldursmarki fyri hoyring av børnum vil eg vísa til frágreiðing í greinini í savninum á heimasíðuni "Hoyring av børnum":
"Einki aldursmark er fyri, nær eitt barn hevur rætt til at bera síni sjónarmið fram. Barnarættindanevndin hjá ST ræður luttakaralondunum frá at seta nakað aldursmark, tað verði seg í lóggávu ella í praksis, sum avmarkar rættin hjá barninum at verða hoyrt í øllum spurningum, sum hava samband við barnið.
Aldur má sostatt ikki forða fyri, at barnið fær loyvi at koma við sínum sjónarmiðum. Gransking vísir, at børn tíðliga menna sín egna vilja og evni at gera sær sjónarmið á ein ella annan hátt, hóast barnið ikki dugir at siga frá teimum við orðum.
Í sambandi við hoyring av einum barni er sostatt ikki neyðugt, at barnið dugir at orða síni sjónarmið týðiliga. Eisini samskifti uttan orð, so sum spæl, andlitsbrá, tekningar og málningar hjá barninum, skal viðurkennast og virðast. Tó má barnið hava vit, vilja og kenslur og duga at samskifta í ein slíkan mun, at tað er møguligt hjá teimum vaksnu at tulka, hvat barnið sigur, og hvat annars kemur til sjóndar hjá barninum so sum yvirbrá og kropsburð. Tað er heldur ikki neyðugt, at barnið hevur sjónarmið um sjálvan spurningin, sum avgerð skal takast um. Tað er nóg mikið, at barnið er ført fyri at meina okkurt av týdningi í sambandi við spurningin."
Ein myndugleiki hevur eftir míni meting ikki upplýst eitt mál nøktandi og í samsvari við Barnarættindasáttmálan, um barnsins sjónarmið ikki eru lýst.

## Notatskylda og journalisering

Fyri at halda innlitslógina, fyri at fáa eina haldgóða avgerðartilgongd, og ikki minst, sum liður í góðum fyrisitingarsiði, er týdningarmikið, at myndugleikar leggja seg eftir at halda reglurnar um notatskyldu eins og skylduna at journalisera.
Notatskyldan skal tryggja, at tað er møguligt at hava eftirlit við, hvat er hent í málinum, eitt nú eftirlit við at upplýsingarskyldan er hildin.
Fyri at halda notatskylduna eigur myndugleikin greitt at skriva niður upplýsingar og týdningarmikil viðgerðarstig viðvíkjandi barnsins besta (grein 3) og barnsins sjónarmiði (grein 12). Myndugleikin eigur eftir míni meting at gera sær ómak at skriva niður og skjalføra nevndu viðurskifti um barnsins besta og barnsins sjónarmið í málið, so tey týðuliga kunnu eyðmerkjast og leitast fram í málinum.
Á henda hátt verður møguligt hjá myndugleikanum sjálvum at hava yvirlit yvir málsgongdina

og samanhangin í málinum, eins og tað er møguligt hjá eftirlitsmyndugleikum at eftirkanna, um barnsins besta og barnsins sjónarmið hevur verið nøktandi lýst og tikið við, tá avgerð varð tikin.
Sí nærri um notatskyldu í greinini "Notatskylda" í savninum á heimasíðuni Grein: Notatskylda (lum.fo)
Sí nærri um journalisering í greinini "Journalisering" í savninum á heimasíðuni Grein: Journalisering (lum.fo)

## Vigan av atlitum

Tá myndugleikin er liðugur at lýsa málið, eigur, eftir míni meting, í málum, sum viðvíkja ella ávirka børn, at síggjast ein lýsing av, hvat ið verður mett at vera til barnsins besta, eins og ein lýsing av barnsins sjónarmiði.
Ein lýsing av barnsins besta (grein 3) og barnsins sjónarmiði (grein 12) má, vísandi til Barnarættindasáttmálan, metast at vera ein sjálvsagdur liður í málsupplýsingarskylduni hjá myndugleikum. Um hesi viðurskifti ikki verða nøktandi lýst, er vandi fyri, at atlitið til barnið ikki verður tikið við millum onnur lóglig og kravd atlit, og at atlitið ikki fær tað tyngd, sum tað eigur at hava, tá avgerðir verða tiknar.
Í sambandi við metan av barnsins sjónarmiði í ítøkiligum málum vil eg vísa til hesa frágreiðing í greinini "Hoyring av børnum" í savninum á heimasíðuni:
"Dentur skal leggjast á sjónarmiðini hjá barninum í samsvari við aldurin á barninum, og hvussu búgvið barnið er. Aldur, og hvussu búgvið barnið er, eru tvær týdningarmiklar og javnsettar treytir, tá metast skal um, í hvønn mun barnsins sjónarmið og ynskir skulu ávirka avgerðina.
Hvussu stórur dentur skal leggjast á sjónarmiðið hjá barninum, kann sostatt ikki bara avgerast út frá aldrinum á barninum, tí hvussu búgvið eitt barn er, er ikki bara treytað av, hvussu gamalt barnið er.
Tess meiri úrslitið av avgerðini ávirkar lívið hjá barninum, tess størri týdning hevur ein røtt meting av, hvussu búgvið barnið er.
Av tí at hugtakið um, hvussu búgvið barnið er, er ógreitt og subjektivt, er tað týdningarmikið, at myndugleikarnir grundgeva, hvussu spurningurin um búning verður mettur, soleiðis at integriteturin hjá barninum verður vardur.

Hvussu stórur dentur skal leggjast á sjónarmiðini og ynskini hjá barninum er eisini treytað av, hvat málið snýr seg um, og hvussu sterk, áhaldandi, veruleikakend, umhugsað og vælgrundað sjónarmiðini hjá barninum eru."
Við støði í Barnarættindasáttmálanum má metast, at barnsins besta (grein 3) er tungtvigandi atlit, tá myndugleikar skulu taka avgerðir. Barnsins sjónarmið (grein 12) eigur eisini at verða tikið við í samsvarið við aldur og búning hjá barninum.
Summar lógir hava ítøkiligar ásetingar um rættindi barnsins at sleppa til orðanna. Nevnast kann til dømis § 44 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd við seinni broytingum:
"Rættindi hjá børnum
§ 44. Eitt barn skal kunnast og hoyrast, um tess menning og búning loyvir tí, og um tað

verður mett at vera til frama fyri barnið.
Stk. 2. Hevur barnið fylt 12 ár, skal tað altíð verða hoyrt, áðrenn ein avgerð verður tikin.
Stk. 3. Dentur skal leggjast á barnsins ummæli.
Stk. 4. Hevur barnið fylt 15 ár, skal tað vera partur í málinum við teimum rættindum, sum har tilhoyra."
Henda áseting áleggur myndugleikum at kunna og hoyra barnið, um tess menning og búning loyvir tí, og um tað verður mett at vera til frama fyri barnið. Um barnið er fylt 12 ár, skal tað altíð verða hoyrt, og dentur skal leggjast á barnsins ummæli.
Henda áseting er, vísandi til Barnarættindasáttmálan, sett inn í barnaverndarlógina fyri at styrkja rættartrygdina hjá børnum í barnaverndarmálum.
Hóast slík áseting sum § 44 í barnaverndarlógini ikki finst í øllum føroyskum lógum, so eigur atlitið til barnsins sjónarmið (grein 12) at verða tikið við í øllum málum, sum viðvíkja ella ávirka eitt barn.
Sum luttakaraland í Barnarættindasáttmálanum hava Føroyar átikið sær eina skyldu, sum førir við sær, at vigan av atlitum í ítøkiligum málum eigur at verða gjørd við virðing fyri grein 3 og 12.
Sí nærri um vigan av atlitinum til barnsins sjónarmið undir punkt 6-8 í greinini "Hoyring av børnum" í savninum á heimasíðuni Grein: Hoyring av børnum (lum.fo)

## Samanumtikið

Fyri at liva upp til ásetingarnar í Barnarættindasáttmálanum og fyri at taka rættar og skynsamar avgerðir, er týdningarmikið, at myndugleikar gera sær ómak at lýsa barnsins besta og sjónarmið barnsins í sambandi við sína málsviðgerð og fyrisiting annars. At lýsa, hvat er til barnsins besta, at lýsa barnsins sjónarmið og lurta eftir barnsins rødd og síðani viga hetta atlit móti øðrum atlitum, má metast at hava avgerandi týdning fyri dygdina og rættleikan av teimum avgerðum, sum skulu takast, og teimum tiltøkum, sum skulu setast í verk.

Grein 3 og grein 12 í Barnarættindasáttmálanum eiga tí, eftir míni meting, í størri mun at verða tiknar við í málsviðgerð og fyrisitingarligum virksemi innan føroysku fyrisitingina. Avgerðir ella tiltøk, sum ávirka børn, eiga ikki at verða tikin uttan at barnsins besta og barnsins sjónarmið eru lýst og hava fingið tað tyngd í avgerðartilgongdini, sum teimum hoyrir til.

# 9 Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann

**1. Partur**

**Umboðsmaðurin og Løgtingið**
**§ 1**. Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.
*2. stk*. Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.
*3. stk*. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2**. Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3**. Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**

**Heimildir**
**§ 4**. Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu), og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.
*2. stk*. Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.
*3. stk*. Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.
*4. stk*. Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.
*5. stk*. Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5**. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur

### Kærumál og egin mál

**§ 6**. Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.
*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.
*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.
*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.
*5. stk.*Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.
*6. stk.* Umboðsmaðurin kann kanna viðgerðina hjá myndugleikunum av útvaldum málum.
*7. stk.* Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

## 4. Partur

### Kanningar

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina klagu til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í klaguni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.
*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.
*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.
*4. stk.* Metir umboðsmaðurin tað vera neyðugt, kann hann uttan rættarúrskurð kanna privatar stovnar v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum, sbrt. § 4, stk. 1.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur

**Niðurstøður**
**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.
*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.
*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.
*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.
*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, um galdandi lógir og fyrisitingarligar ásetingar eru sambæriligar við altjóða skyldur at tryggja barnarættindi, herundir sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá børnum. Rakar umboðsmaðurin við lýti í hesum sambandi, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um lýti í ásetingum, ásettar av eini kommunu, skal umboðsmaðurin boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur

**Lønar- og eftirlønarviðurskifti**
**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.
*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.
*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur

### Fyrisiting

**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.
*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur

### Ígildisreglur

**§ 18**. Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.
*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# 10 Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur og kanningar í 2024, har álit og skriv vóru almannakunngjørd

Málini kunnu lesast á **www.lum.fo**

| Dagfesting | Málsnr. | Heiti á málinum á heimasíðuni |
|---|---|---|
| 12-01-2024 | 23/11561 | Álit um handfaringina hjá Klaksvíkar kommunu av klagum um óljóð |
| 26-01-2024 | 23/19764 | Álit um málsviðgerðina hjá Leigunevndini av einum kærumáli |
| 26-02-2024 | 23/16837 | Álit um góðkenning frá Umhvørvismálaráðnum av broyting av byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu |
| 13-03-2024 | 23/18827 | Álit um viðgerðartíð og vantandi svar frá Tórshavnar kommunu viðvíkjandi klagu um garðbygging |
| 15-07-2024 | 24/11241 | Álit um vantandi svar frá Vága kommunu í sambandi við eina umbøn um innlit í egið mál |
| 29-08-2024 | 24/17345 | Álit um avgerð hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum at geva avmarkað innlit í vinnuligar fiskiroyndir |
| 12-09-2024 | 24/16456 | Skriv um treytirnar sambært landsstýrislønarlógini fyri eftirløn við 60 ára aldur |
| 26-09-2024 | 24/12012 | Álit um mannagongd og fyrisiting hjá Umhvørvismálaráðnum í sambandi við góðkenning av byggisamtyktum |
| 05-11-2024 | 24/15211 | Skriv til Barna- og útbúgvingarmálaráðið í sambandi við klagu um vantandi frítíðartilboð til barn við serligum tørvi |
| 06-11-2024 | 24/01298 | Eftirlitsvitjanir á røktarheimum |
| 08-11-2024 | 24/09468 | Álit um málsviðgerðina og reglugerðina hjá Runavíkar kommunu í sambandi við tillutan av grundstykkjum |
| 02-12-2024 | 24/09110 | Samandráttur av skrivi um kunngerð um tíðaravmarkaða serskipan fyri veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2023 |
| 30-12-2024 | 23/18132 | Eftirlitsvitjanir á stovnum, sum veita umlætting til børn, ið ikki eru undir barnavernd |

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR, UNDIR BRYGGJUBAKKA 11, POSTMOGA 2008, FO-110 TÓRSHAVN